# GERÐABÓK

**Dato:** 25. mars 2021
**Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 74/21 – 106/21**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Juistinussen
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 232<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 74/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 234 |
| 75/21 | 21/00755-1 | Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2020 hjá Westward Ho | 236 |
| 76/21 | 16/03305-2 | Bátadráttur í Nólsoy | 238 |
| 77/21 | 19/00083-1 | Bátahylur í Álakeri | 240 |
| 78/21 | 21/00757-1 | Pakkhús hjá Faroe Ship á Eystaru bryggju | 247 |
| 79/21 | 21/00547-1 | Fundarskipan fyri trivnaðarnevndina | 250 |
| 80/21 | 21/00548-1 | Fundarskipan fyri mentamálanevndina | 255 |
| 81/21 | 21/00546-1 | Fundarskipan fyri Heilsu og eldranevndina | 260 |
| 82/21 | 21/00662-1 | Fundarskipan fyri vinnunevndina | 264 |
| 83/21 | 20/03128-3 | Matr.nr. 91t, Kollafjørur. Eigari heitir á kommununa um at taka grundstykkið innaftur. | 268 |
| 84/21 | 21/00637-2 | Matr.nr. 22y, Kaldbak. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu. | 270 |
| 85/21 | 20/03745-1 | Umsókn um fíggjarligan stuðul til skótadepulin "í millum Tjarna" hjá Skótalið KFUM's | 272 |
| 86/21 | 21/01228-1 | Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands | 277 |
| 87/21 | 19/04413-1 | Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur | 279 |
| 88/21 | 18/03863-5 | Uppskot um avtalu millum Kommunufelagið og Nám um undirvísingartilfar | 295 |
| 89/21 | 20/00622-1 | Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt | 300 |
| 90/21 | 17/01760-5 | Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 161b, 185c og 156, Tórshavn. undir Bryggubakka og Rektaragøta | 306 |
| 91/21 | 20/03621-37 | Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn | 314 |
| 92/21 | 20/03632-29 | Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla) | 317 |
| 93/21 | 20/03830-2 | Formel áheitan um yvirtøku av landsvegum í Tórshavnar kommunu | 319 |
| 94/21 | 18/00808-1 | Vágsbotnur - skipan av økinum | 322 |
| 95/21 | 20/04607-1 | Spælipláss í kommununi | 326 |
| 96/21 | 21/00684-1 | Brúgv í Havnardali | 329 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 233<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 97/21 | 21/00407-1 | Miðbýarætlan - Havnará | 331 |
| 98/21 | 21/00857-2 | Keyp av parti av litra ap (Dalavegur) og part av matr. 805, at leggja saman við matr. 803f | 334 |
| 99/21 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 336 |
| 100/21 | 20/01446-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn | 342 |
| 101/21 | 20/04637-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður | 346 |
| 102/21 | 20/04633-2 | Umbøn um lendi og broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 126a, Nólsoy frá C-øki til D-øki | 348 |
| 103/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 350 |
| 104/21 | 16/03741-6 | Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen | 352 |
| 105/21 | 21/01260-1 | Uppskot til loysn á stóru parkeringstrupulleikunum í miðbýnum í Havn | 358 |
| 106/21 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 360 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 234 |
| | Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 74/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 75/21 Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2020 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nevndin fyri Westward Ho | 01.03.2021 | 1/21 | 21/00755-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 37/21 | 21/00755-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 75/21 | 21/00755-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Roknskapurin fyri 2020 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2020 verður framlagdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Nevndin fyri Westward Ho 01. mars 2021:** Roknskapurin góðkendur og undirskrivaður.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 76/21 Bátadráttur í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.09.2016 | 32/16 | 16/03305-2 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 15.11.2016 | 11/16 | 16/03305-2 |
| 3 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 29/20 | 16/03305-2 |
| 4 Nólsoyarnevndin | 28.04.2020 | 4/20 | 16/03305-2 |
| 5 Havnanevndin | 09.03.2021 | 12/21 | 16/03305-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 38/21 | 16/03305-2 |
| 7 Nólsoyarnevndin | 18.03.2021 | 3/21 | 16/03305-2 |
| 8 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 76/21 | 16/03305-2 |

**Málslýsing:**

Á fleiri borgarafundum í Nólsoy, hevur verið víst á, at verandi dráttur í Nólsoy ikki kann brúkast til størri bátar.

Um nýggjur bátadráttur skal gerast, er helst rættast at gera hann úti á Klyvum.
Ein leyslig meting er, at ein hóskandi bátadráttur kostar umleið 800.000, kr.

**Vinnunevndin 06. september 2016:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum í sambandi við fíggjarætlanina í 2017 og at senda málið til nólsoyarnevndina til kunningar.

**Nólsoyarnevndin 15. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur avsett kr. 800.000 til ger av bátadrátti úti á Klyvum í Nólsoy.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at beina málið í Nóloyarnevndina til hoyringar, og at bjóða arbeiðið út.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 28. apríl 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Arbeiðið hevur verið boðið út.

Tvey tilboð eru upp á arbeiðið:

| | |
|---|---|
| West Trading | 835.250 kr. |
| Articon | 786.629 kr. |

Í tilboðnum er ikki roknað við veiting fyri el og vatn.

Arbeiðið varð mett at kosta kr. 800.000. Í kostnaðarmetingini vóru kr. 173.000 avsettar til el, vatn og ókent.

Fyri at fulføra arbeiðið, er neyðugt at játta tilsamans kr. 960.000

Býráðið hevur avsett kr. 800.000 til bátadrátt í Nólsoy.

Í játtanini til bátahyl við Sjógv, tá nýggjar brúgvar vóru lagdar út, og bátadrátturin bleiv gjørdur av nýggjum, standa kr. 271.000 eftir.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon, og at játta kr. 960.000.
At arbeiðið verður fíggjað við kr. 800.000, sum er avsett til bátahyl í Nólsoy, og við kr.160.000 frá konto 7476 smábátahavnir, L74007 Bátahylur við Sjógv.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Nólsoyarnevndin 18. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 77/21 Bátahylur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 3/19 | 19/00083-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 4/19 | 19/00083-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 6/19 | 19/00083-1 |
| 4 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 36/19 | 19/00083-1 |
| 5 Vinnunevndin | 27.06.2019 | 40/19 | 19/00083-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 217/19 | 19/00083-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 187/19 | 19/00083-1 |
| 8 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 5/20 | 19/00083-1 |
| 9 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 13/20 | 19/00083-1 |
| 10 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 20/20 | 19/00083-1 |
| 11 Vinnunevndin | 11.05.2020 | 44/20 | 19/00083-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 111/20 | 19/00083-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 88/20 | 19/00083-1 |
| 14 Havnanevndin | 09.03.2021 | 11/21 | 19/00083-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 39/21 | 19/00083-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 77/21 | 19/00083-1 |

**Upprunin til málið: Upprunin til málið:**
Býráðið hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió kr til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri.
Tað hevur verið tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn í nógv ár. Við ársenda 2018 vóru tað 200, sum stóðu á bíðilista til bátapláss, og sum øll hava goldið kr. 2.000 í depositum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavn og á Argjum eru tilsamans 550 bátapláss. Tað hava ymiskar ætlanir verið frammi um at gera bátahavn, men ongin hevur borið á mál.
Síðani simuleringar vóru gjørdar av bátahyli í Álakeri í 2006, er havnarlagið nógv útbygt, og tann nýggi molin kemur nógv longur vestur. Simuleringar vísa, at havnaútbyggingin betrar um kyrruna í Álakeri.
Nýggj simulering eigur at verða gjørd, áðrenn farið verður víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í byggisamtyktini er økið lagt av til havnarøki.
Tá bygt verður út á sjógv, skal loyvi fáast frá friðingarmyndugleikunum.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru avsettar 2 mió. til smábátahavn í Álakeri.
Metingar av einari bátahavn í Álakeri vísa, at tað verður pláss fyri millum 200- og 250 bátum, alt eftir bátastødd og hvussu havnin verður skipað við flótibrúgvum.
Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er at gera simulering av Álakeri, fyri at vita um- og hvussu tað ber til at fáa tað kyrt. Kostnaðurin fyri at gera eina simulering er kr. 200.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Mælt verður til at gera byggiprogram.
Eisini verður mælt til at gera simuleringar, at fíggja av íløgum fyri bátahyl í Álakeri.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Simuleringar:**
DHI hevur gjørt simuleringar.
Longri brimgarðurin er, sum verjir bátahylin, kyrrari verður í bátahylinum. Royndir eru gjørdar við 3 ymiskum longdum.
Í fyrsta uppskotinum er innsiglingin til bátahylin 70 m, í næstu royndini er innsiglingin 50 m breið og í triðja uppskotinum er innsiglingin 30 m breið.
Smælari innsiglingin er, betur verður kyrran í bátahylinum, men munurin á kyrruni har innsiglingin er ávikavist 50- og 30 metur er lítil.
Simuleringar er gjørdar við at samanbera kyrruna av verandi bátaplássum í Havn, við bátaplássini í nýggju bátahavnini í Álakeri.
Um tann loysnin, har innsiglingin er 50 metur verður vald, sigur simuleringin, at kyrran verður eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð.
Ein leinging av molanum upp á 20 metur er mett at kosta kr. 1,5 mió

**Byggiprogram (úrdrag):**
Umleið 230 bátapláss, sum øll eru við flótibrúgvar.

Brúgvar og bátabummar vera av sama slagi, sum nýggjasta brúgvin á Skálatrøð.

Økið á landi verður víðka við 2.000 m$^2$.

Fram við sjóvarmálanum verður gjørdur ein 120 m langur grótskrái upp til lendið omanfyri.

Neyðugt verður at dýpa eitt umleið 100 m stórt øki útfyri neystini á vestaru síðu á Álakersvík niður á 2 m dýpi.

210 m langt grótkast, sum er 4 m. høgt.

Nýggjur dráttur til kappróðrarbátar.

Streymúttøk og vatn til bátar, verður á øllum brúgvunum.

Arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Licitatión í februar 2020.

Arbeiðið liðugt í apríl 2022.

**Loyvir:**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Byggisamtyktin má regulerast.
Byggiloyvi.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019,
at projektera og bjóða arbeiðið út
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tá projekteringin er liðug, er kanska rættast at leggja málið aftur fyri nevndina, har støða verður tikin til at bjóða arbeiðið út.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

| | |
|---|---|
| Avsett í fíggjarætlan 2019: | 2.000.000 |
| Brúkt til simuleringina | 112.000 |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | 345.000 |
| Eftir til projektering og fyrireiking | 1.543.000 |

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019
at projektera
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.
at játta í mesta lagi kr. 1.543.000 til projektering og fyrireiking

**Vinnunevndin 27. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2020, eru 10 mió avsettar til bygging av smábátahavn í Álakeri.

Projekteringin er komin so langt, at arbeiðið væntandi kann bjóðast út primo mars 2020.

Í fyrsta umfari er ætlanin at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum.

**Tilmæli frá havnarmeistranum**: Mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og málið kemur fyri aftur í vinnunevndini á fyrst komandi fundi til kunningar.

**Ískoyti:**
Tað fyrsta byggistigið, sum er at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum krevur ikki nógv arbeiðsfólk. Tað merkir, at tað helst eru fleiri fyritøkur, sum kunnu útføra arbeiðið. Ein máti at fáa fleiri fyritøkur at bjóða, er at bjóða út í almennum útboði.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Í staðin fyri at bjóða út í innbodnari licitatión, verður mælt til at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Málið bleiv útsett.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari licitatión millum 7 arbeiðstakarar og licitatiónin var hildin hin 28. apríl á Havnaskrivstovuni. Hesi tilboð komu inn (j.nr. 19/00083-16):

| Arbeiðstakari | Tilboðsupphædd | |
|---|---|---|
| SP/F Plan | kr. | 24.683.681,30 |
| SP/F Maskingrevstur | kr. | 26.119.645,00 |
| Andrias Berg SP/F | kr. | 17.604.145,00 |
| Sp/f Ian Rasmussen | kr. | 15.270.060,00 |
| SP/F Grettir | kr. | 17.494.690,00 |
| P/F Tórhall Hansen | kr. | 14.006.468,00 |
| Spf Konsax | kr. | 16.222.063,27 |
| Sp/f Ian Rasmussen, Alternativt boð | kr. | 14.007.863,00 |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini og mælir í skrivi dagfest 30/4, j.nr. 19/00083-17 til at taka av lægsta tilboð frá Tórhalli Hansen áljóðandi kr 14.006.468,00.

Tórshavnar Havn og ráðgevin hava havt innleiðandi samráðingar við P/F Tórhall Hansen um ymisk viðurskifti, m.a. tíðarætlanina. Tíðarætlanin fyri arbeiðstøkuna var upprunaliga sett til 8 mánaðir frá 1. mai 2020 og árið út. Vit eru farin framvið 1. mai 2020 og tí er ikki realistiskt at fáa arbeiðið liðugt til 31/12-2020. Tað tekur eisini tíð at starta arbeiðið upp, og summarfrítíðin stendur fyri framman. Mett verður tí, at ein tíðarætlan á 10 mánaðar frá 1. juli er meiri realistisk. Arbeiðið verður tá liðugt 30/4-2021.

Sum nevnt í málslýsingini umfatar útbodna arbeiðið at gera brimgarð og økið fram við landi, t.e. grótskrái, trappur, gongubreyt, kantsteinar, fundament til ljóssteyrar og festir til bátabrúgvar.

Tað sum síðani er eftir at gera, er at útvega sjálvar bátabrúgvarnar, tekniskar installatiónir (el og vatn) umframt liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering v.m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

| | |
|---|---|
| **Kostnaður** | |
| Tilboð Arbeiðstøka P/F Tórhall Hansen | 14.006.468 kr |
| Ókent (8%), fyrireiking og projektering, fakeftirlit og byggileiðsla | 2.068.500 kr |
| Aldusimulering | 112.000 kr |
| **Kostnaður í Alt** | **16.187.000 kr** |
| | |
| **Fígging** | |
| Avsett á FÆ 2019 til bátahyl í Álakeri | 2.000.000 kr |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | -345.000 kr |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | -600.000 kr |
| Avsett á FÆ 2020 til bátahyl | 10.000.000 kr |
| **Tøk fígging í alt í 2020** | **11.055.000 kr** |
| | |
| **Írestandi fígging** | **5.132.000 kr** |
| | |

Á langtíðaríløguætlanini eru í 2021 avsettar 15 mió. kr. til bátahyl í Álakeri.

**Tilmæli**
Havnameistarin mælir til:

- At taka av tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 14.006.467,00 og gera sáttmála um arbeiðið
- At játta kr 10.000.000 av løgukarminum í 2020 deild 7476 smábátahavnir.
  At avseta og játta kr 5.132.000 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2021.

**Vinnunevndin 11. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fara í samráðingar við arbeiðstakaran um møguleikan at flyta grótið til bátahylin við báti av Glyvursnesi.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá vinnunevndini, ið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Málið beint í býráðið umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi byggiloyvi til bátahylin í Álakeri, so hevur kommunan fingið eina umsókn frá Tórshavnar Havn, j.nr. 20/01445. Hendan umsókn verður viðgjørd, lýst og løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið í avvarandi nevndir áðrenn endaliga støðutakan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og ongari blankari og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

Ískoyti:
**Dýping við bátabrúgv**
Við tað innastu bátabrúnna, sum skal leggjast út í Álakeri, verða umleið 34 bátapláss, alt bátastøddini.
Í einum parti av bátabrúnni er tað so grunt, at 7 bátapláss fella burtur, sum merkir at tað ikki verða meira enn 27 pláss.

**Dýping framman fyri neyst:**
Framman fyri tey sunnastu neystini koma fleiri kneysar undan á fjøru, soleiðis at tað er trupult at fóta bátin, seliga á fjøru.
Tað er eitt ynski frá neystamonnunum at fáa dýpt.

Áðrenn arbeiðið bleiv boðið út, var møguleikin at dýpa við spreinging umrøddur, men gingið var burtur frá hesum, tí tryggingar treytirnar vóru so strangar, tí oljutangarnir vóru so tætt uppat.

Ein annar møguleiki er at brekka við einari stórari maskinu, men tað er trupult at geva eitt tilboð upp á hetta.

P/F Tórhall Hansen, sum stendur fyri arbeiðinum at gera brimgarðin, metur at arbeiðið kann gerast fyri kr. 250.000.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta kr.250.000 til arbeiðið, sum verða fíggjaðar av konto 7476 smábátahavnir, L00001 løgukarmar fyri árið.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 78/21 Pakkhús hjá Faroe Ship á Eystaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.03.2021 | 10/21 | 21/00757-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 40/21 | 21/00757-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 78/21 | 21/00757-1 |

**Upprunin til málið**
Síðani Tórshavnar havn lat pakkhúsið á Eystaru byggja í 1990, hevur Faroe Ship leigað pakkhúsið. Faroe Ship eigur ein part av pakkhúsinum, sum teir hava umbygt til frystigoymslu.

**Lýsing av málinum**
Upp gjøgnum árini, hevur Faroe Ship gjørt stórar íløgur í pakkhúsið, fyri at tað skuldi lúka krøvini til effektivan flutningshátt.

Nýggja havnarlagið á Eystaru bryggju verður væntandi tikið í brúk komandi heyst, og er ætlanin tí at Faroe Ship byggir nýtt pakkhús úti á Skansabryggjuni. Áðrenn Faroe Ship byggir nýtt pakkhús, má greiða fáast á viðurskiftunum, í verandi pakkhúsi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við, at Faroe Ship í 2004 fekk optión upp á at keypa pakkhúsið, varð eisini avtalað, at Tórshavnar havn kundi yvirtaka pakkhúsið, ímóti at rinda Faroe Ship 7 mió fyri íløgunar, teir høvdu gjørt í pakkhúsið.
Tá varð eisini avtalað, at virðið minkaði við kr. 187.000 um árið.
Um hesin avskrivingar leistur verður brúktur, er virðið komi niður á (7.000.000 –(187.000 *17)), kr.3.179.000 pr. 01.04.2021.

Í 2010 samtykti býráðið at selja pakkhúsið til Faroe Ship, men kommunala eftirlitið setti sum treyt fyri søluni, at tað skuldi lýsast alment til sølu, og bleiv sølan tí av ongum.

Av tí at Faroe Ship ikki fekk loyvi at keypa pakkhúsið í 2010, varð samráðst um at gera nýggjan leigusáttmála fyri pakkhúsið.

Í 2013 liggur eitt uppskot um leigusáttmála á borðinum. Avtalan blívur ikki løgd fyri nevnd, og tískil ikki undirskrivað.
Í hesi avtaluni verður sagt, at um útleigarin uppsigur leigumálið, skal útleigarin endurrinda leigaranum íløguna upp á 9 mió kr, frádrigið kr. 300.000 um árið.
Um hesin avskrivingar leistur verður brúktur, er virðið komið niður á (9.000.000 -(300.000 * 8)) kr. 6.600.000 pr. 01.04.2021.

Aftan á samráðingar, eru Tórshavnar havn og Faroe Ship samdir um, at eitt hóskandi endurgjald er ((6.000.000 + 3.179.000) /2)  kr. 4.889.500

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

## Skjøl

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
(stutt frágreiðing um fíggjarlig viðurskiftið)

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 4.889.500 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 2022 | Dato 2022 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at rinda Faroe Ship kr. 4.889.500 , sum gjald fyri íløgur, teir hava gjørt í pakkhúsið.
Upphæddin fellur til gjaldingar, tá Faroe Ship eru fluttir í nýggja pakkhúsið á Skansabryggjuni.
Íløgan verður fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2022.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 79/21 Fundarskipan fyri trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 13/21 | 21/00547-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 79/21 | 21/00547-1 |

**Fundarskipan fyri**
**Trivnaðararnevndina**
**(NEVNDARARBEIÐI)**

**MANNING OG MÁLSØKI**

**§ 1**

**1. petti.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki hjá trivnaðarnevndini ásettar í 5. parti, grein 27, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, grein 11, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR TRIVNAÐARNEVNDARINNAR**

**§ 2**

**1. petti.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum

**§ 3**

**1. petti.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við formanni og næstformanni. Fyri at val skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

**§ 5**
**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar.
Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt sosiala deildarleiðaranum og/ella fundarskrivaranum - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**

**§ 6**

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum og borgarstjóranum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.
**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

**§ 7**

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á kommunuskrivstovuni í minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**4. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til trivnaðarstjóran.

**VIÐTØKUFØRI**

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

**FUNDARLEIÐSLA**

**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, varanevndarformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

**FRAMLØGA AV MÁLUM**

**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

**GEGNI**

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.

**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.
Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.
**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

**ATKVØÐUGREISLA**
**broytingar- og eykabroytingaruppskot**

**§ 12**

Nevndarlimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum nevndarinnar, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

**§ 13**

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram við at rætta hondina upp. Er atkvøðugreiðslan eftir formansins tykki ógreið, letur hann nevndina atkvøða av nýggjum.
**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið fallið.
**3. petti.** Heldur formaðurin, at allir limir eru samdir, kann hann gera kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir limur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
**4. petti**. Nevndarlimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.
**5. petti.** Avgerð, sum nevndin hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir limir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.
**6. petti.** Nevndarlimur kann sambært § 32 í kommunustýrislógini, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

**GERÐABÓKIN (O.A.)**

**§ 14**

**1. petti.** Avgerðir nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Limur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina.
**3. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**4. petti.** Tá ein fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

**VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN**

**§ 15**

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**

**§ 16**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.
**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.

**Sambært § 1, 1. petti:**

**Úr 5. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 27**
**Trivnaðarnevndin**

**1. petti.** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.
Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum. Nevndin fyrisitur eisini undirvísingarmál innan fólkaskúlaøkið.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikk
4. Fólkaheilsa
5. Integratión
6. Fólkaskúli, harundir forskúli

**3. petti.** Nevndin fyrisitur ávísar stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál, fólkaskúlar og kommunalar íbúðir.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur lógarbundar játtanir til skúlabarnaflutning, lærlingaútreiðslur, almennan serskúla, eftirskúlagjøld v.m.

**Úr 3. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 80/21 Fundarskipan fyri mentamálanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.03.2021 | 42/21 | 21/00548-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 80/21 | 21/00548-1 |

**Fundarskipan fyri**
**Mentamálanevndina**
**(NEVNDARARBEIÐI)**

**MANNING OG MÁLSØKI**

**§ 1**

**1. petti.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki hjá mentamálanevndini ásettar í 5. parti, grein 29, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, grein 11, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR MENTAMÁLANEVNDARINNAR**

**§ 2**

**1. petti.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum

**§ 3**

**1. petti.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við formanni og næstformanni. Fyri at val skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

**§ 5**

**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar.
Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt mentamálaleiðaranum og/ella fundarskrivaranum - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**

**§ 6**

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum og borgarstjóranum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.

**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

**§ 7**

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, stýðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á kommunuskrivstovuni í minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**4. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til trivnaðarstjóran.

**VIÐTØKUFØRI**

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

**FUNDARLEIÐSLA**

**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, varanevndarformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

**FRAMLØGA AV MÁLUM**

**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

**GEGNI**

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.

**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.
Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.
**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

## ATKVØÐUGREISLA
## broytingar- og eykabroytingaruppskot

### § 12

Nevndarlimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum nevndarinnar, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

### § 13

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram við at rætta hondina upp. Er atkvøðugreiðslan eftir formansins tykki ógreið, letur hann nevndina atkvøða av nýggjum.
**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið fallið.
**3. petti.** Heldur formaðurin, at allir limir eru samdir, kann hann gera kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir limur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
**4. petti**. Nevndarlimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.
**5. petti.** Avgerð, sum nevndin hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir limir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.
**6. petti.** Nevndarlimur kann sambært § 32 í kommunustýrislógini, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

## GERÐABÓKIN (O.A.)

### § 14

**1. petti.** Avgerðir nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Limur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina.
**3. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**4. petti.** Tá ein fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

## VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN

### § 15

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**

**§ 16**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.
**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.

**Sambært § 1, 1. petti:**

**Úr 5. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 29**
**Mentamálanevndin**

**1. petti.** Mentamálanevndin hevur 5 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Dagstovnaøkið, harundir frítíðarskúlar og ungdómsvirksemi, námsfrøðiliga ráðgeving og tilboð til børn við serligum tørvi
2. Musikkskúli
3. Kvøldskúli
4. Býarbókasavn
5. Býarsavn
6. Mentanarhøli
7. Stuðulsskipanir
8. Svimjihøll
9. Ítróttaranlegg
10. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

**3. petti.** Nevndin gevur viðmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum gøtum, vegum o.ø. sambært tilmæli frá serstakari nevnd, bólki e.ø.

**Úr 3. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**Mentamálanevndin 15. mars 2021:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 81/21 Fundarskipan fyri Heilsu og eldranevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 09.03.2021 | 8/21 | 21/00546-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 81/21 | 21/00546-1 |

**Fundarskipan fyri**
**Heilsu og eldranevndina**
**(NEVNDARARBEIÐI)**

**MANNING OG MÁLSØKI**

**§ 1**

**1. petti.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki hjá heilsu og eldranevndini ásettar í 5. parti, grein 28, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, grein 11, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR HEILSU OG ELDRANEVNDARINNAR**

**§ 2**

**1. petti.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum

**§ 3**

**1. petti.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við formanni og næstformanni. Fyri at val skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

**§ 5**

**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar.
Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt heilsu- og umsorganarstjóran og/ella fundarskrivaranum - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**

**§ 6**

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum og borgarstjóranum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.
**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

**§ 7**

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á kommunuskrivstovuni í minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**4. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til heilsu- og umsorganarstjóran.

**VIÐTØKUFØRI**

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

**FUNDARLEIÐSLA**

**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, varanevndarformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

**FRAMLØGA AV MÁLUM**

**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

**GEGNI**

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.

**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.
Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.
**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

**ATKVØÐUGREISLA**
**broytingar- og eykabroytingaruppskot**

**§ 12**

Nevndarlimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum nevndarinnar, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

**§ 13**

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram við at rætta hondina upp. Er atkvøðugreiðslan eftir formansins tykki ógreið, letur hann nevndina atkvøða av nýggjum.
**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið fallið.
**3. petti.** Heldur formaðurin, at allir limir eru samdir, kann hann gera kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir limur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
**4. petti**. Nevndarlimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.
**5. petti.** Avgerð, sum nevndin hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir limir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.
**6. petti.** Nevndarlimur kann sambært § 32 í kommunustýrislógini, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

**GERÐABÓKIN (O.A.)**

**§ 14**

**1. petti.** Avgerðir nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Limur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina.
**3. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**4. petti.** Tá ein fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

**VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN**

**§ 15**

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**

**§ 16**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.
**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.

**Sambært § 1, 1. petti:**

**Úr 5. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 28**
**Heilsu og eldra nevndin**

**§ 28**

**1. petti.** Heilsu- og eldranevndin hevur 5 limir.
Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið í tann mun fyriskipanirnar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænastuna, herundir røktarheimspláss, umlættingar- og rehabiliteringspláss, heimatænasta og heimasjúkrarøkt, dag- og kvøldtilhald, venjingar umframt aðrar tænastur á eldraøkinum.
2. Kommunulæknaskipan
3. Heilsufrøðiskipan

**3. petti.** Nevndin fyrisitur heilsu- og umsorganartænastuna og stovnar undir hesi. Nevndin fyrisitur eisini hvíldarheimið Naina, serflutningsskipanina og tilboð til heimleys.

**Úr 3. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mars 2021:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

## 82/21 Fundarskipan fyri vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 11.03.2021 | 13/21 | 21/00662-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 48/21 | 21/00662-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 82/21 | 21/00662-1 |

**Fundarskipan fyri vinnunevndina (NEVNDARARBEIÐI)**

**MANNING OG MÁLSØKI**

**§ 1**

**1. petti.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki hjá vinnunevndini ásettar í 1. parti, grein 31, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, grein 11, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR VINNUNEVNDARINNAR**

**§ 2**

**1. petti.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum

**§ 3**

**1. petti.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við formanni og næstformanni. Fyri at val skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

**§ 5**

**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar.
Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt fundarskrivaranum - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**

**§ 6**

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum og borgarstjóranum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.
**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

**§ 7**

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á kommunuskrivstovuni í minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**4. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til kommunustjóran.

## VIÐTØKUFØRI

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

## FUNDARLEIÐSLA

**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, varanevndarformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

## FRAMLØGA AV MÁLUM

**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

## GEGNI

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.

**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.
Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.
**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

**GERÐABÓKIN (O.A.)**

**§ 12**

**1. petti.** Niðurstøður nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarniðurstøður verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**3. petti.** Tá ein fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til niðurstøðu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.
**4. petti.** Niðurstøður frá fundi í Vinnunevndini skulu leggjast fyri Fíggjarnevndina til støðutakan.

**VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN**

**§ 13**

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**

**§ 14**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.
**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.

**Sambært § 1, 1. petti:**

**Úr 1. parti í kommunustýrisskipanini**

**Aðrar nevndir**

**§ 31**
**Vinnunevndin**

**1. petti.** Undir fíggjarnevndini verður sett ein vinnunevnd við 5 kommunustýrislimum, ið skal viðgera vinnumál.

**2. petti.** Nevndin viðgerð og leggur fyri fíggjarnevndina mál, ið viðvíkja hesum málsøkjum:
1. Vinnuvirksemi og vinnubygningar, tó ikki á havnaøkinum
2. Vinnupolitikkur og vinnumál
3. Ferðavinna/cruisevinna
4. Handils- og tænastuvinnu
5. Vinnunýskipan
6. Vinnustrategi
7. Hýruvognsloyvi
8. Hugskotið
9. Stuðulsjáttanir á ferðavinnuøkinum

**3. petti.** Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanin.

**Úr 3. parti í kommunustýrisskipanini**

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**Vinnunevndin 11. mars 2021:** Samtykt og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 83/21 Matr.nr. 91t, Kollafjørur. Eigari heitir á kommununa um at taka grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 209/20 | 20/03128-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 186/20 | 20/03128-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 42/21 | 20/03128-3 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 83/21 | 20/03128-3 |

**Upprunin til málið**:
Eigari heitir á kommununa um, at taka grundstykkið matr.nr. 91t, Kollafjørður, innaftur.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Grundstykki, Bøgøta 47, Kollafjørður. Matr. nr. 91t. Vídd 516m2. Ógrivið.
Keypsprísur 242.525,16 Skeytið tinglýst 13.12.2018

Keyparin ynskir at lata grundstykkið innaftur.

Sambært skeytisásetingum framgongur at allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara og at Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kort. Umbøn frá eigara.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 269 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 242.525,16

Seljarin rindar útreiðslur til tinglýsing av afturkeyps skeytinum kr. 3.425,25

Tá ið kommunan hevur ognað sær grundstykkið, verður grundstykkið lýst til sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá ognarmeklara. Innkomið boð er kr. 550.000,00 Onkið mótboð kom innan freist, og hevur ognarmeklari tikið grundstykkið av sølulista, meðan bíðað verður eftir avgerð.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja ognina fyri innkomið boð áljóðandi kr. 550.000,00

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við at selja grundøki í fríari sølu og heldur, at grundøkið í staðin átti at verið selt eftir vanligu útlutingartreytunum hjá Tórshavnar kommunu.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

# 84/21 Matr.nr. 22y, Kaldbak. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 43/21 | 21/00637-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 84/21 | 21/00637-2 |

**Upprunin til málið:** Verandi eigarar keyptu grundstykkið frá kommununi í 2018. Tey søkja nú um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

**Lýsing av málinum**

Grundstykkið er til víddar 511 fermetrar, og er ógrivið.

Sambært grein 5 í skeytinum, hevur keyparin ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum, ella at kommunan gevur loyvi til søluna.

Tað kann viðmerkjast, at kommunan seldi grundstykki hjá ognarmeklara til ásettan minstaprís kr. 200.000 og fingu verandi eigarar stykkið til keyps fyri kr. 200.000 sum var hægsta boð.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:** Líknandi viðgerð í málum 19/03004 – 19/04251

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kort. Teldubræv frá Meklara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til ikki at keypa grundstykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum vísandi til at stykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum og heldur, at grundøkið átti at verið keypt aftur av kommununi og selt eftir vanligu útlutingartreytunum hjá Tórshavnar kommunu.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

# 85/21 Umsókn um fíggjarligan stuðul til skótadepulin "í millum Tjarna" hjá Skótalið KFUM's

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.10.2020 | 71/20 | 20/03745-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 238/20 | 20/03745-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 325/20 | 20/03745-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 18/21 | 20/03745-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 44/21 | 20/03745-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 85/21 | 20/03745-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Umsókn til fíggjarligan stuðul til Skótadepulin "Í millum tjarna" hjá Skótalið KFUM´s**

Skótalið KFUM's søkir um fíggjarligan stuðul til at gera skótadepulin úti í Havnardali lidnan. Leiguøkið er nær um liðugt og ynskir KFUM at fáa økið liðugt í heyst.

KFUM hevur gjørt eina smáttu í økinum við terassu og hitapotti og tveir dvalarvikar til umleið 20 fólk tilsamans. Ein dvalarviki verður gjørdur afturat til 4-5 fólk. Harafturat er eitt amfiteater til yvir 100 fólk, stórt tjaldingarpláss og innilokað bálpláss, har møguleiki er fyri at yvirnátta. Harafturat eru fýra wc á staðnum og møguleiki er fyri at knýta wc-vognar í.

Eftir hjá felagum er at hampa gøtur og vegir, gera vollar fram við gøtum, fáa amfiteatrið liðugt, gera ymsar vatnpostar ol.

Eisini skal ymiskt keypast, so sum legubálsstað, grillútgerð, skrellispannir, benkur og borð.

Hetta kemur at verða ein frítíðarperla úti í vøkru náttúruni. Barnagarðar og skúlar kunnu eisini gera dagtúrar út í Skótadeplinum "Í millum tjarna" í Havnardali.

Møguleikar eru eisini hjá borgarum í kommununi at gera dagtúrar út í skótadepulin, har man kann grilla og hugna sær. Felagið skrivar, at ætlanin er harumframt at hýsa ferðafólk í økinum allar árstíðir.

Upphæddin, ið restar í, er 150.000 kr.

KFUM brúkar í høvuðsheitum ikki økið, tá ið summarfrítíð er.

Ætlanin er, at Visit Tórshavn ger eina avtalu við KFUM skótarnar um at leiga tjaldingarplássið út til ferðafólk um summarið. Avtalan kann eisini víðkast við øðrum tiltøkum.

Møguleiki er eisini fyri, at tað eina wc verður alment wc fyri borgarar og ferðafólk og kommunan einans rindar fyri reingerð.

Áðrenn stuðul verður útgoldin, má felagið lata kommununi yvirlit yvir ætlaðar útreiðslur at gera økið liðugt og roknskap fyri stuðulin/samsýningina, tá ið arbeiðið er liðugt.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at játta kr. 150.000 av konto 7710 Ferðavinna til Skótalið KFUM's til at gera skótadepulin "Í millum Tjarna" lidnan og at KFUM og Visit Tórshavn gera avtalu um, hvussu Visit Tórshavn leigar tjaldingarpláss v.m. til ferðafólk um summarið.

Somuleiðis verður mælt til at beina málið um alment wc í skótadeplinum í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Vinnunevndin 05. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin tekur undir við, at avtala verður gjørd við Skótaliðið KFUM um at eitt av vesunum verður alment vesi, og at raksturin av almenna vesinum verður skipað smb einari heildarætlan fyri almenn wc. *Mál nr 18/03758 almenn wc í Tórshavnar kommunu.*
Tilmælið sum varð til politiska viðgerð og samtykt í býráðnum 27.02.2020 er soljóðandi *"At áðrenn fleiri nýggj wc verða tikin í nýtslu, skal ein rakstrarætlan fyriliggja og fígging til rakstur verða fingin til vega. Í hesum sambandi ger umsitingin eitt uppskot til at bjóða út raksturin av øllum almennum kommunalum toilettum í Tórshavnar kommunu."*
Smb heildarætlanini verður eitt vesi tætt við skógfriðaða økið við Sandá. Mett verður ikki at almenna vesið á skótadeplinum kann koma í staðin fyri vesið við Sandá, men heldur verður lagt afturat heildarætlanini. *Sí skjal 18/03758-11 almenn wc heildarætlan 25-11-2020*

Umsitingin staðfestir at smb brúksavtalu millum Tórshavnar kommunu og Skótalið KFUM´s hevur skótaliðið brúksrætt til 3300 fermetrar á matr nr 1160a.*Sí skjal 19/00789-3 Sáttmáli KFUM.*Tá ið hugt verður at myndakortinum sæst, at skótaliðið hevur skipað virksemi á uml 6600 m$^2$. *Sí skjal 20/03745-7 KFUM virksemisøki*. Brúksavtala og brúk eigur at samsvara, og eigur avtalan ella virksemið at verða tillagað veruleikanum.

**Onnur mál ið hava týdning fyri málið:**
19/00789-Ólóglig bygging hjá KFUM skótunum á matr. nr. 1160a, Havnardalur, Tórshavn
18/03758 almenn wc í Tórshavnar kommunu

**Skjøl:**
18/03758-1 almenn wc í Tórshavnar kommunu
18/03758-11 almenn wc heildarætlan 25-11-2020
19/00789-3 Sáttmáli KFUM
19/00789-3 KFUM Øki/kort Havnardalur
19/00789-3 Skitsa yvir økið
20/03745-7 KFUM virksemisøki

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til,
- at tikið verður undir við at eitt av vesunum í Skótadeplinum verður partur av skipanini av almennum vesum í Tórshavnar kommunu.
- At rakstur av almennum vesum verður lagt í somu skipan hjá Húsaumsitingini sum aðrir kommunalir bygningar.
- At fíggjarnevndin endurskoðar brúksavtaluna við KFUM skótar, so avtalan og veruleikin samsvara.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti.**

Nýggj upptekning er gjørd av økinum og fyriliggur nýtt kortskjal, sum umfatar tað økið sum KFUM skótar brúka. Nýggj brúksavtala er gjørd, sum umfatar alt økið. Sí skjal ( 20/03745 – 12 )

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at góðkenna nýggja brúksavtalu sí skjal nr. 20/03745 – 12, sum umfatar brúk av einum øki á uml. 12.857m2.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

KFUM skótarnir hava nakrar viðmerkingar til uppskot til sáttmála.  ( Nýggj brúksavtala við viðmerkingum skjal 20/3745-17 )

Skótarnir hava gjørt veg, soleiðis at koyrandi er inn á og inni á økinum við bili.
Skótarnir ynskja at vegurin verður partur av brúks økinum. Ætlanin er at sperra vegin av við ketu, soleiðis at almenningurin ikki kann koyra inni á økinum. Sí viðmerkingar í grein 3, í broyttari brúksavtalu. Tó skal almenningurin til eina og hvørja tíð hava óavmarkaða atkomu til og gjøgnum økið, eftir teimum gøtum sum liggja inni á økinum, og skal almenningurin hava ótarnaðan rætt til at koma til tjørnina og at brúka tjørnina í sama mun sum brúkarin.

Skótarnir ynskja 20 ára brúksavtalu, vísandi til íløgurnar sum verða gjørdar á brúksøkinum.

Partar av árinum, tá ið skótarnir ikki brúka økið, hava skótarnir ætlanir um at leiga økið út til ferðavinnuendamál, tískil er ynski um at kunna framleiða øðrum økið í styttri tíðarskeiðum upp til einar 3 mánaðar. Sí viðmerkingar grein 4 í brúksavtalu.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

KFUM skótarnir hava nakrar viðmerkingar til uppskot til sáttmála. ( Nýggj brúksavtala við viðmerkingum skjal 20/3745-17 )

Skótarnir hava gjørt veg, soleiðis at koyrandi er inn á og inni á økinum við bili.
Skótarnir ynskja at vegurin verður partur av brúks økinum. Ætlanin er at sperra vegin av við ketu, soleiðis at almenningurin ikki kann koyra inni á økinum. Sí viðmerkingar í grein 3, í broyttari brúksavtalu. Tó skal almenningurin til eina og hvørja tíð hava óavmarkaða atkomu til og gjøgnum økið, eftir teimum gøtum sum liggja inni á økinum, og skal almenningurin hava ótarnaðan rætt til at koma til tjørnina og at brúka tjørnina í sama mun sum brúkarin.

Skótarnir ynskja 20 ára brúksavtalu, vísandi til íløgurnar sum verða gjørdar á brúksøkinum.

Partar av árinum, tá ið skótarnir ikki brúka økið, hava skótarnir ætlanir um at leiga økið út til ferðavinnuendamál, tískil er ynski um at kunna framleiða øðrum økið í styttri tíðarskeiðum upp til einar 3 mánaðar. Sí viðmerkingar grein 4 í brúksavtalu.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.


**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

KFUM skótarnir hava nakrar viðmerkingar til uppskot til sáttmála. ( Nýggj brúksavtala við viðmerkingum skjal 20/3745-17 )

Skótarnir hava gjørt veg, soleiðis at koyrandi er inn á og inni á økinum við bili.
Skótarnir ynskja at vegurin verður partur av brúks økinum. Ætlanin er at sperra vegin av við ketu, soleiðis at almenningurin ikki kann koyra inni á økinum. Sí viðmerkingar í grein 3, í broyttari brúksavtalu. Tó skal almenningurin til eina og hvørja tíð hava óavmarkaða atkomu til og gjøgnum økið, eftir teimum gøtum sum liggja inni á økinum, og skal almenningurin hava ótarnaðan rætt til at koma til tjørnina og at brúka tjørnina í sama mun sum brúkarin.

Skótarnir ynskja 20 ára brúksavtalu, vísandi til íløgurnar sum verða gjørdar á brúksøkinum.

Partar av árinum, tá ið skótarnir ikki brúka økið, hava skótarnir ætlanir um at leiga økið út til ferðavinnuendamál, tískil er ynski um at kunna framleiða øðrum økið í styttri tíðarskeiðum upp til einar 3 mánaðar. Sí viðmerkingar grein 4 í brúksavtalu.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

KFUM skótarnir hava nakrar viðmerkingar til uppskot til sáttmála. ( Nýggj brúksavtala við viðmerkingum skjal 20/3745-17 )

Skótarnir hava gjørt veg, soleiðis at koyrandi er inn á og inni á økinum við bili.
Skótarnir ynskja at vegurin verður partur av brúks økinum. Ætlanin er at sperra vegin av við ketu, soleiðis at almenningurin ikki kann koyra inni á økinum. Sí viðmerkingar í grein 3, í broyttari brúksavtalu. Tó skal almenningurin til eina og hvørja tíð hava óavmarkaða atkomu til og gjøgnum økið, eftir teimum gøtum sum liggja inni á økinum, og skal almenningurin hava ótarnaðan rætt til at koma til tjørnina og at brúka tjørnina í sama mun sum brúkarin.

Skótarnir ynskja 20 ára brúksavtalu, vísandi til íløgurnar sum verða gjørdar á brúksøkinum.

Partar av árinum, tá ið skótarnir ikki brúka økið, hava skótarnir ætlanir um at leiga økið út til ferðavinnuendamál, tískil er ynski um at kunna framleiða øðrum økið í styttri tíðarskeiðum upp til einar 3 mánaðar. Sí viðmerkingar grein 4 í brúksavtalu.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála við viðmerkingum tó soleiðis, at grein 4 verður soljóðandi:

«Hendan avtala gevur ikki brúkara keyps- forkeyps-, ella hevdsrætt til økið í framtíðini.
Økið kann nýtast av øðrum í styttri tíðarskeið.»

Fíggjarnevndin viðmerkir, at økið ikki skal nýtast á handilsligum grundarlagi í ferðavinnuhøpi.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 277 |
| | Formansins merki: |

# 86/21 Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 86/21 | 21/01228-1 |

**Upprunin til málið**

## Lýsing av málinum

Lýsing av málinum – samandráttur
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017, verður nevndin í P/F Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

§ 3. Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin.
Stk. 2. Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2.
Stk. 3. Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:
1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.
2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur
3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu
4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu
5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin
6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin
Stk. 4. Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at *"nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir."*
Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at *"Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum."*

## Lógir, ásetingar o.a.

Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læッtar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Heðini Mortensen at velja Bjørgfríð Ludvig í nevndina í P/F Visit Faroe Islands, ið varð einmælt samtykt.

## 87/21 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 324/19 | 19/04413-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 9/20 | 19/04413-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 33/20 | 19/04413-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 12/20 | 19/04413-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 10/20 | 19/04413-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 73/20 | 19/04413-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 78/20 | 19/04413-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 123/20 | 19/04413-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 55/20 | 19/04413-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 29.04.2020 | 110/20 | 19/04413-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 80/20 | 19/04413-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 171/20 | 19/04413-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 225/20 | 19/04413-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 264/20 | 19/04413-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 256/20 | 19/04413-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 13/21 | 19/04413-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 22.02.2021 | 40/21 | 19/04413-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 15.03.2021 | 56/21 | 19/04413-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 49/21 | 19/04413-1 |
| 20 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 87/21 | 19/04413-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 24.03.2021 | 67/21 | 19/04413-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 25.03.2021 | 73/21 | 19/04413-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Samandráttur**
TK hevur 5 fótbóltsvallir í fullari støðd, umframt Eysturvøll og tilhoyrandi stadion kring leikvallirnar. Talan er um stór og týðandi anlegg, ið hýsa umfatandi virksemi gjøgnum stóran part av árinum, men eisini anlegg, ið tørva regluligar dagføringar v.m. Í málinum verður gjørd eina støðulýsing, umframt givið eitt boð uppá framtíðar løgutørv.

**Lýsing av málinum**

<u>Alment</u>
Metingarnar í hesum yvirlitinum eru í høvuðsheitum grundaðar á metingar hjá umsitingini og Ítróttaanleggum. Talan er um yvirskipaðar metingar, sum skulu takast við ávísum fyrivarni, men sum geva eina rímiliga greiða ábending. Í hvørjum einstaka føri vil ítøkilga tilgongdin geva eitt endaligt svar uppá kostnaðir v.m.

**Viðv. tørvi á at skifta graslíki:**

- Ovari vøllur í Gundadali
Seinasta vallarkanningin í sambandi við UEFA-dystir var gjørd á várið 2019 og fekk vøllurin aftur góðkenning. Sí hjálagt skjal. Vøllurin er enn í rímiligum standi, men verður neyðugt at fyrireika eina møguliga útskifting innan stutta tíð. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst í summar lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til á sumri 2021 og skiftast á sumri 2021. Feløgini í Gundadali mæla hinvegin til at skifta vøllin í 2020, og at sprinkling eigur at verða løgd undir vøllin. Vøllurin er næsttýdningarmikli fótbóltvøllurin hjá TK. og verður mett at útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.300 tkr., við sprinklilg nærri 5.000. tkr

- Niðari vøllur
Vøllurin er nógv skalaður í sambandi við Vesturskýlisverkætlanina á Tórsvølli. Verkætlanin er væntandi farin av vøllinum á heystið 2020 og verður mælt til at gera økið í stand aftur og skifta vøllin á várið 2021, enn er tó óvist viðv. skaðum og lendisarbeiði. Saman við neyðugum lendisarbeiði verður samlaði kostnaðurin mettur til uml. 5.000-5.500 tkr.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Vøllurin er tann elsti – umleið 10 ár og stendur fyri útskifting. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat, men er tað uppá lánta tíð. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2021 og skal í seinasta lagi skiftast á várið/sumri 2022. Útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.000 tkr.

- Tórsvøllur
Seinasta vallarkanningin var gjørd á várið 2019. Sí hjálagt skjal. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2020, og sostatt ikki skiftast fyrrenn á vári/sumri 2021. Hinvegin ætlar FSF at skifta vøllin í 2020 í sambandi við, at FSF er vertur fyri EM-endaspæli fyri U17 í apríl/mai 2020. Vøllurin er týdningarmiklasti fótbóltvøllurin í TK og verður mett, at útskifting av vøllinum, flyting og umskipan av sprinklaraskipan (7 pkt. til 12. pkt.) o.a. verður mett til umleið 5.000 tkr. FSF hevur sagt seg vera sinnað at rinda 50% av kostnaðinum.

- Eysturvøllur
Vøllurin er sum heild í góðum standi og er ætlanin at hann skal halda nøkur ár afturat.

- Hoyvíksvøllur
Vøllurin er í góðum standi. Tað ganga fleiri ár áðrenn tørvur aftur er á útskifting.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**:

Alment
Vallarreglugerðin hjá FSF setur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

- Ovari vøllur

Ljósstyrkin pt. er umleið 80 lux. Skal vøllurin uppfylla vallarreglugerðina er ábending um, at bæði fundament og mastrar skulu skiftast umframt lutvíst nýggjar el-talvur, kábling og + nýggir projektørar. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Argir
Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Helst mugu fundament, mastrar, elskipan og projektørar gerast av nýggjum. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Niðari vøllur
Er framyvir mest ein venjingarvøllur og ikki til dystir í fremstu og næstfremstu deild. Í sambandi við Tórsvallaverkætlanina verða mastrar og ljós skift á eystaru síðu og kostar tað nakrar fáar hundrað túsund. Vestara síða er eisini um at verða útlivað og kostar helst minst eini 1.500 tkr. at dagføra.

- Hoyvíksvøllur
Ljósskipanin er nýggj og ca. 250 lux og tekur seg væl út og tykist hava lítlan ampa fyri grannalag. Uppfyllir vallarreglugerðina hjá FSF. Ongin orsøk sum er til broyting ella stórvegis íløgur.

- Eysturvøllur
Tað verður ikki mett neyðugt við nøkrum serstøkum átaki.

**Umstøður kring station**

- Ovari vøllur í Gundadali
Í sambandi við skifting av graslíkinum er tørvur á at gera nýggja girðing, umframt aðrar ábøtur á vestaraskýli o.a.

- Niðari vøllur
Í sambandi við upprætting av undirlagnum og nýggjum graslíki skal eisini nýggj girðing gerast, umframt finna eina góða loysn fyri økið móti ovara vølli.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m.

- Tórsvøllur
Er partur av øðrum máli. Stig 8 í avtaluni við FSF um økið har bygningarnir við niðara vøll standa – er næst á skrá.

- Eysturvøllur
Ynskiligt at fingið gjørt fleiri p-pláss norðanfyri stadion.

- Hoyvíksvøllur
Tørvur er á eini røð av hentleikum. Station hevur undantak frá reglunum í Vallarreglugerðini. Talan er um mio.kr. tørv. Av kringumstøðunum kunnu nevnast tørv á at tryggja skráningin norðanfyri móti Skúlanum við Løgmannabreyt, at gera áskoðarapláss, felagshús til skifting v.m. Umframt átroðkandi tørv á at gera hægri girðing sunnanfyri vøllin móti Jørundargøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Graslíkisvallir hava við sær umhvørvisárin herundir serliga dálking frá gummigranulati o.a. Umsitingin og Ítróttaanlegg leggur seg eftir at loysnir og røkt eru so frægar sum gjørligt.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við einari endaligari tilráðing um raðfestingar og tíðarætlan til ein komandi fundi

**Mentamálanevndin 27. November 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðar-íløguætlanini er lagt upp til fígging til áhaldandi dagføringar 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 5.000 tkr. til Gundadal/Argir (vallarøkið) og ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 3.000 tkr. 2022, umframt ætlaðar 7.000 tkr. í 2021 til ljós til vøllir í Gundadali og á Argjum.

**Sjónarmið hjá HB og B36**
Umsitingin hevur havt fund við HB og B36 um raðfestingar av tøka løgukarminum fyri 2020 og hugsanir um ár 2021 og framyvir og umrøddu, um feløgini mettu, at ljósskipan ella graslíki skuldi koma fyrst í raðfestingunum fyri 2020. Hetta tí tað ikki er fíggjarliga møguligt at fremja báðar verkætlanirnar í 2020 fult út innan fyri givna fíggjarkarmin. Teirra einmælta tilmæli er, at TK skiftir graslíki á ovara vølli á sumri 2020 og um møguligt eisini at fáa sprinklaraskipan til vøllin ella at gera fyrireikingar til tað.

Við støði í galdandi samtyktu fíggjarætlan fyri 2020 og teimum teimum fíggjarligu útlitunum, umframt tilmælinum frá HB og B36, umframt dialogi við FSF, verður mett, at fylgjandi raðfesting er eitt boð upp á raðfestingar í 2020, 21 og 22. Henda raðfesting er tó ikki meiri føst enn at hon kann endurskoðast, so hvørt orsøkir eru til tess.

**Ráðgeving í sambandi við verkætlanirnar**
Gerast skulu avtalur um ráðgeving um graslíkisvøllin. Hartil kemur spurningurin um sprinkling. Verður avgjørt at fara undir fyrireikingar til at gera spinklaraskipan til ovara vøll, er eisini upplagt hava í huga framtíðar tørvin at leggja rør til útskifting av el-kaðalum til komandi nýggju ljósskipanina.

Arbeiðið uppá nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli gongur sína gongd og herundir liðugtgerð av horninum móti B36 húsinum. Ein komandi nýggj ljósmastur til ovara vøll skal sannlíkt setast har á leið, og er tí upplagt at fáa gjørt eitt mastrafundament til hana longu nú í 2020, so tað ikki verður neyðugt at fara afturumaftur í 2021, tá ljósskipan annars ætlandi skal gerast við Ovara vøll.

Sostatt er greitt, at talan er um eina samanseting av fleiri ráðgevaraøkjum t.v.s. innan lendis- og graslíkisviðurskifti, innan sprinklaraskipan (HVS) og innan konstruktión og el hvat viðvíkur mastrafundamenti til nýggja ljósmastur við B36 húsið/Tórsvøll.

Um tað skal bera á mál, serliga við at skifta graslíki á sumri 2020, er neyðugt at fáa gjørt avtalur við ráðgevast sum skjótast og fáa boðið arbeiðini út.

Hvat viðv. gerð av mastrafundamenti við B36-húsið verður mett mest hóskandi at geva ráðgevunum, ið eru á teirri verkætlanini, møguleika fyri at gera ískoytisavtalu um tað, umframt at geva høvuðsarbeiðstakaranum har høvi at gera avtalu um gerð av arbeiðinum. Hetta tí at tað vanliga vil vera óneyðuga tvørligt at fáa aðrar ráðgevar og arbeiðstakarar inn um entreprisumark, har aðrir longu virka.

**Máltalva/stórskermur**
Verandi stórskermur er ikki í nøktandi standi til at tað er ráðiligt at brúka hann til komandi kappingarár, ið byrjar í mars 2020. Tí er átroðkandi sum skjótast at fara undir at útvega ein nýggjan. Umsitingin hevur kannað, um tað hevði borið til at leigað ella langtíðarleigað ein slíkar stórskerm í staðin fyri at keypa hann. Fyrimunurin við at leiga er minni tekniskur váði og skjótari útskifting, ið vanliga vildi verið 5. hvørt ár. Mettur kostnaður fyri ein slíkan skerm er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

**Meting um hvat letur seg fremja innan fyri setta fíggjarkarmin**
Vegna atlit til marknaðar- og kappingarviðurskifti eru mettar upphæddir o.a. lagdar í hjálagda fylgiskjali.

**Tórsvøllur stadion**
Tórsvøllur, sum tjóðarleikvøllur Føroya, er mentur og bygdur stigvíst í tøttum samstarvi millum FSF og TK. Sí hjálagt avrit av galdandi sáttmálum millum FSF og TK og sí eisini mál 16/00962 Tórsvøllur - vestursíðan. Arbeitt verður við at gera endaligu rakstraravtaluna fyri Tórsvøll lidna til nevndarviðgerð í vár.

Vísandi til seinastu vallarkanningina av Tórsvølli, og av tí at FSF er vertur fyri HM endaspæli fyri U17 kvinnur í mai-juni 2021, ynskir FSF at skifta graslíki á Tórsvølli í 2020. Eisini ynskir FSF at fáa gjørt fleiri sprinklaradysur og fáa flutt verandi sprinklaradysur á vøllinum soleiðis, at tær eru nærri leikvallarøkinum. Í dag eru dysurnar staðsettar soleiðis, at tær ofta koma at standa innan fyri talgildu ljósbandareklamurnar og tí ikki kunnu virka sbrt. endamálinum.

FSF er til reiðar at leggja út fyri verkætlanina, treytað av at FSF og TK gera eina avtalu um, at TK rindar sín part av verkætlanini við seinni høvi. Fyribils metingin av verkætlanini er upplýst í hjálagda fylgiskjali og tá gingið út frá, at lagt verður upp til at útvega allarbestu dygd av graslíkisteppi og gummigranulati. Harumframt er ætlanin at leiga ein nýggjan stórskíggja til stadion.

Eisini er lagt upp til at fáa sett ein fjarhitavekslara til hitaskipanina í vøllinum og soleiðis fáa eina eyka trygd fyri, at týðandi landsdystir kunnu verða spældir størri part av árinum. Ætlanin er at kanna, um sami vekslari kann veita hita til Fimi, B36-húsið og HB-húsið. Mettur kostnaður er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

Samstundis er eisini ynskiligt at kunna bjóða út veitingina av graslíki av báðum verkætlanunum í senn og soleiðis vónandi kunna spara nakað.

**Viðv. fyribils raðfestingum fyri 2021 og 22**
<u>2021</u>
Endurskapan av lendinum og skifting av graslíki við niðara vøll í Gundadali, umframt at gera nýggja ljósskipan til ovara vøll.

<u>2022</u>
Skifta graslíki á Argjum og at fáa nýggja ljósskipan har.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara í samráðingar við FSF um at gera samstarvsavtalu um at skifta graslíki, flyta sprinklaraskipanina á Tórsvølli í 2020, umframt verkætlan við hitavekslara, og at TK rindar sín part í 2021 og 2022 og at venda aftur við eini avtalu til støðutakan.

b). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at fremja pkt. a. og at venda aftur í nevndina við einum úrsliti til støðutakan.

c). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at skifta graslíki á ovara vølli í Gundadali á sumri 2020, umframt gera fyrireikingar til at gera sprinklaraskipan á vøllinum og at venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

d). at heimila umsitingini at samráðast við ráðgevar á Tórsvallar-vesturskýlisverkætlanini (t.e. Sp/f MAP, Sp/f HMP Consult og P/F LBF) um at gera eitt mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll til eina komandi nýggja ljósskipan við ovara vøll og venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

e). at flyta 5.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við Mantamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at skifta gráslíki á ovara vølli og at fáa ljósviðurskiftini í rættlag í ár og játta neyðuga peningin av konto nr. 6275.

Málið beint í býráðið.

**Ískoyti:**

**Viðv. Tórsvølli**
TK og FSF eru komin á samt um samstarvsavtalu um verkløgini við Tórsvøll Stadion. Sí hjálagt uppskot.

**Viðv. fjarhitaskipan til Tórsvøll**
Ítróttaanlegg eru í holt við saman við ráðgeva at gera eina fyribils loysn við at nýta tveir hitavekslarar, ið TK eigur frammanundan, og knýta teir í fjarhitaskipanina og vallarskipanina. Kostnaðirnir í hesum umfari eru arbeiðsløn at gera arbeiðið, umframt útvegan av frostvesku til hitaskipanina í vøllinum. Kostnaðurin í hesum umfarinum verður mettur til 200 tkr. Um royndin eydnast væl, skal støða takast til, um hetta er ein nøktandi og varandi loysn. Talan er um eina loysn, ið gevur umleið 1,4 MW og gevur eisini fjarhita til hornabygningin á Tórsvølli, har skipanin er staðsett.

**Viðv. verkløgunum annars á Tórsvølli**
Umsitingin saman við ráðgeva er í holt við at fyrireika og bjóða út arbeiðini viðv. nýggjum graslíki, flyting av sprinklaraskipanini, umframt útvegan av nýggjum stórskíggja. Væntandi verður klárt at taka støðu til tilboðini í mars.

**Viðv. verkløgum á Ovara vølli**
Fyrireikingar eru í gongd viðv. gerð av avtalum um gerð av mastrafundamenti í eina horninum á Ovara vølli, móti B36 húsinum. Væntandi verður tað arbeiðið útint á sumri 2020. Ráðgevi er eisini í holt við at fyrireika og bjóða út verkløgini við Ovara vøll. Væntandi verður klárt at taka støðu til innkomin tilboð í mars.

**Stórskíggi til ovara vøll**
Umsitingin hevur viðgjørt møguleikan at leiga ein skíggja. Mett verður hóskandi at útvega ein stórskíggja til ovara vøll beinanvegin. Ítróttanlegg heintar inn tilboð.

**Umhvørvisatlit**
Umhvørvisdeildin hevur gjørt vart við, at TK hevur tikið undir við sonevndu KIMO ásetingunum (sí hjálagt skjal) fyri at minka um dálking frá graslíkisvøllum. Tað verður kannað nærri, hvussu TK á frægasta vís kann betra um umhvørvisviðurskiftini í sambandi við verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at taka undir við samstarvsavtaluni við FSF
b). at heimila umsitingini at útinna fyribils loysn viðv. íbinding av fjarhitaskipan til Tórsvøll.
c). at heimila umsitingini at útvega stórskíggja til ovara vøll við leiguavtalu.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Atkvøtt varð um tilmælini frá fíggjarnevndni 22. januar 2020 og 1. apríl 2020, og vórðu tey einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
20. apríl 2020 var licitatitón uppá endurnýggjan av graslíkisvøllinum, og annað viðkomandi í hesum sambandi, til Ovara vøll í Gundadali.

Seks feløg vóru boðin at bjóða. Trý lótu inn tilboð.

Hesi vóru:
Laiderz Aps. (filial skrásett í FO)
Metatron EHF/Polytan Danmark A/S
Unisport Scandinavia A/S / Jónfinn Olsen

Í hjálagda fylgiskjalið sæst licitatiónsprotokollin.

Ráðgevin og umsitingin hava viðgjørt tilboðini og er hjálagda tilmæli komið frá ráðgevanum.

Mælt verður til at Laiderz Aps. fær møguleikan at gera sáttmála um verkætlanina. Hetta tí at felagið hevur lægsta boð og at dygd v.m. er í samsvari við krøvini í útbjóðingartilfarinum. Sama felag vann eisini útboðið seinast TK bjóðaði út – tá graslíki v.m. til nýggja Hoyvíksvøll.

Tá verkætlanin var boðin út, var ávís óvissa um standin á stoytdoyvingarlagnum, men er ráðgevin komin eftir, at tað sera sannlíkt er tørvur á at skifta tað nú og er tað tí tikið við.

Vegna økt krøv til burturbeining av verandi tilfari og ávís óvissa kring kostnaðin fyri sjálva innlatingina til Brennistøðina og møguliga endurnýtslu, verður mælt til at kostnaðurin fyri burturbeining (pos. 2.5 og 2.6) ikki verður partur av sáttmálanum, men at TK sjálvt ger avtalu um tað. Loysnin er antin at senda tilfarið samlað til endurnýtslu ella at gera sortering í Føroyum. Hetta verður kannað nærri komandi vikurnar.

Áljóðandi er sáttmálin (høvuðstilboð Laiderz) sostatt: 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG)
Harumframt er sett av 900 tkr. til ráðgeving, ókent (herundir burturbeining v.m.) og kommunalt MVG.

**Áleggingartíðspunkt**
Arbeiðið verður ætlandi gjørt frá umleið mánaðarskiftinum juni/juli og umleið 4 vikur fram. Ætlanin er avstemmað við HB og B36 og FSF. Í juni 2020 vera fyrireikingar gjørdar viðv. komandi sprinklaraskipanini, so tað ikki kemur í vegin seinni og er klárt tað hetta verklagið verður útint.

**Fíggjar- og búskaparviðurskifti**
Á projektkontu L57031 eru 5.000 tkr. tøkar. Hetta inniber sostatt at tað, sum var í ætlanini fyri 2020 ikki letur seg gera fult út í 2020. Til ein komandi fund kemur tilmæli um restina av verkløgunum í Gundadali.

**Umhvørvisviðurskifti**
Samskifti hevur verið við Umhvørvisdeildina um betranarátøk til frama fyri betri umhvørvisvernd móti dálking frá mikroplasti og verða ymisk tiltøk framd í 2020 og 21 í hesum sambandi.

**Farsóttarstøðan**
Vegna serligu støðuna er ávís óvissa kring nøkur viðurskifti, ið annars ikki eru vanlig. Roynt verður at taka neyðug fyrilit tí viðvíkjandi. Í evsta lagi kann tað viðføra meirkostnaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndin til at samtykkja at taka av

høvuðstilboðnum frá Laiderz Aps. og at gera sáttmála við felagið á 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG) at fíggja av projektkontu L57031. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
Vallarverkætlanin
TK hevur skrivað undir sáttmála við Laiderz Aps. um endurnýggjan av graslíknum við Ovara vøll í Gundadali. Arbeiðið byrjar um mánaðarskiftið juni/juli 2020 og tekur væntandi 4-6 vikur.
Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður farið undir at gera ristir og brunnar økinum kring vøllin til at samla upp mikroplast frá vøllinum og harvið tryggja at leikvøllurin lýkur KIMO-ásetingarnar.

Sprinklaraskipan
Umsitingin og ráðgevin eru í holt við fyrireiking til at fáa útvega og sett upp 8 sprinklaraboksir kring vøllin. Arbeiðið verður ætlandi framt um mánaðarskiftið juni/juli 2020.

Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður ætlandi farið undir at leggja rør til sprinklarahúsið.

Mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll

Umsitingin og ráðgevin eru í holt við fyrireiking til at fáa projekterað og útint at gera eitt fundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll. Arbeiðið verður ætlandi útint í august/september 2020.

Tá kappingarárið er liðugt seint í 2020 verður farið undir at leggja el-kaðalar kring vøll til nýggja elskipan, ið skal veita streym til nýggju ljósmastrarnar kring vøllin. Nærri tilmæli um útbjóðing av verkætlanini viðv. ljósmastrum verður lagt fyri nevnd í heyst og verður ætlandi útint fyrst í 2021.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL
Verkætlanin viðv. fjarhitaskipan er framt. Í september verður farið undir fyrireikingar til flyta sprinklaraskipanina, umframt fyrireikað útbjóðing av at endurnýggja graslíkið. Ætlandi verður tað bjóðað út saman við veiting av nýggjum graslíki til Niðara vøll í Gundadali.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARAVØLL
Í september verður byrjað uppá fyrireikingar og verða mál løgd fyri nevndina í oktober 2020.

Fíggjar- og búskaparviðurskifti
Á fundinum vera dagførdar kostnaðarmetingar fyri verkløgini í 2020 og 21 gjøgnumgingnar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at umsitingin arbeiðir víðari við at fyrireika og fremja verkløgini.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL
Í dialogi eru kommunan og FSF komin ásamt um at graslíkið á Tórsvølli skal skiftast í juli 2020, umframt flyting av sprinklaraskipanini verður gjørt um sama mundi. Eisini fer at vera kannað um tað ber til at fáa spinklaraskipanina til at arbeiða skjótari, so tað ber til at sprinkla vøllin í hálvleikinum. Skotið verður upp at útbjóðingin at graslíkisveitingini til vøllin verður boðin út saman við arbeiðinum við nýggjum graslíki og stoytdoyvingarlagi til niðara vøll, men at útboðið eisini er sett soleiðis saman at FSF og kommunan eisini kunnu velja bara at taka av øðrum. Fyri at hava rímiliga tíð til útbjóðingartilgongdina verður mett hóskandi at fáa heimild til útboð soleiðis at støða kann takast til tilboð antin í desember 2020 ella januar 2021. Ætlanin er at halda fram við P/F LBF sum høvuðsráðgeva.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
-Vøllurin
Arbeiðið við vøllin er nú avhendað. Ætlanin verður vøllurin skoðaður í mun til FSF og UEFA krøv innan 2 vikur.
Endalig uppgerð av arbeiðinum higartil verður tøk til fundin.
- Sprinklaraskipan
Rør og kassar eru lagdir í vøllin og er nú eftir at fara undir liðugtgerð av sprinklaraskipanini við pumpuskipan, stýring v.m.. Alt eftir uppgerðini av arbeiðinum higartil, er ætlanin antin at fáa gjørt arbeiðið liðugt innanfyri verkætlanina ella evt. at fíggja ein part av rakstrinum. Nærri frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin í okt.
- Ljósverkætlan
Arbeiðið við fundamenti til ljósmastur í horninum við B36/Vesturskýlið var útsett vegna atlit til Vesturskýlisverkætlanina og sprinklaraskipan. Æltanin er nú at fara undir projektering av verkætlanini so skjótt sum tað er greitt viðv. játtan fyri 2021 til endamálið og fáa tað boðið út í februar 2020 og arbeiðið útint í mars-apríl 2020.

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARA VØLL
- Lendisarbeiði
Neyðugt verður at fáa gjørt vøllin av nýggjum og herundir at fáa upprættað lagið undir drensasfaltinum í parti av vallarøkinum, umframt lagt drenasfalt í størri parti av vallarøkinum, umframt fáa tikið av verandi stoytdoyvingarlag og graslíki og lagt alt tað av nýggjum.
- Nýtt stoytdoyvingarlag og graslíki
Harumframt er neyðugt at leggja nýtt stoytdoyvingarlag, umframt nýtt graslíki.

- Økið millum ovara vøll og niðara vøll má eisini gerast soleiðis at tað er trygt og gevur pláss fyri atkomu v.m.

- Neyðugt verður við játtan til girðing og nýggjar ljósmastrar og projektørar á suðursíðuni og projektørar á norðursíðuna. Tær mastrarnar eru partur av vesturskýlisverætlanini.

- Tíðarætlan: Mett verður hóskandi at byrja arbeiðið við niðara vøll so skjótt sum játtan er tøk í 2021 og er málið at leggja nýtt graslíki í apríl-mai 2020 áðrenn U17 EM endaspælið fyri kvinnur verður í mai 2020.

Metingar av kostnaði
Sí hjálagt fylgiskjal við metingum fyri einstøku postarnar í hesi ætlan. Samanlagt er talan um ein mettan tørv á umleið 10.000 tkr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting til Tórsvøll og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Útboðið verður gjørt saman við veiting av stoytdoyvingarlagi og graslíki til niðara vøll sum møguleika.

b). At heimila umsitingini at fara undir innleiðandi fyrireikingar til útboð av arbeiðum við Niðara vøll.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL
- 5. oktober 2020 verður ovari vøllur kannaður av óheftum kanningarpersóni frá Sports Lab. Niðurstøðan er væntandi tøk innan fáar dagar. Síðani verður viðgjørt um leggjast skulu á størri nøgdir av gummigranulati og um henda nøgd eigur at vera partur av arbeiðstøkuni ella onnur veiting.

- Ráðgevin hevur gjørt meting viðv. fyrireiking og gerð av sprinklaraskipanini, ið tekur støði í pumpu- og stýriskipanini á Tórsvølli. Skjal við kostnaðarmeting verður tøkt mánadagin. Tá verður talan um at ein sprinklaradysa er í nýtslu í senn og tekur ein fullfíggjað sprinkling tá umleið 15 min. Í einum seinni umfari kann vera viðgjørt um at fáa eina skipan, ið kann sprinkla uppá helvtartíð, men vil tað innibera ein upphædd sum helst er tað tvífalda.

Umsitingin er í holt við at gera upp fíggjarstøðuna á verkætlanarjáttanini fyri 2020 (L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu). Nærri greiðing kemur til fundin, men er neyvan nøktandi upphædd tøk til at gera sprinklaraskipanina lidna. Mælt verður tí til at fíggja restina av kontu 5717 Ítróttaanlegg.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fremja verkætlan við sprinklaraskipan.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neytabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ OVARA VØLL**
Á verkætlanarkontuni L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu eru umleið kr. 50.000 eftir. Arbeiðið at gera sprinklaraskipanina er ikki liðug enn.

Kommunan hevur 10. desember 2020 fingið sendandi sertifikat frá FIFA við góðkenning av Ovara vølli sbrt. FIFA Quality Pro skipanini. Sí hjálagt skjal. Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá støðuni viðv. graslíkinum á Ovara vølli og sáttmálaviðurskiftunum við veitaran.

Sbrt. fíggjarætlanini fyri 2021 eru á løgukontu 5775 Ítróttaanlegg, Ovari vøllur játtaðar kr. 4 mió til ljósskipan til Ovara vøll. Í løtuni verða viðurskiftini kring verandi mastrar kannaði nærri, og hvussu ein hóskandi ljósskipan kundi verið samansett. Mett verður tó sannlíkt, at ein nýmótans skipan ikki rúmast innanfyri játtaðu upphæddina, ella í øðrum lagi verður neyðugt at minka nakað um ætlaðu ljósstyrkina í fyrsta umfari, og so ístaðin gera klárt til at kunna økja um talið av ljósprojektørum seinni.

Samstundis er umsitingin í holt við at kanna, um ein alternativ loysn letur seg gera, har hæddin á mastrunum verður lækkað og samstundis vera tvær nýggjar mastrar settar upp í miðjuni. Henda greining er ikki liðug enn, men vil umsitingin greiða frá henni á fundinum.

Alt eftir niðurstøðuni viðv. ljósskipan til Ovara vøll, og um avgjørt verður at endurnýggja alla skipanina, verður neyðugt at gera fundamentið í horninum millum B36-húsið og nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli, áðrenn byggiplássið har verður riggað av í apríl-mai 2021. Í løtuni verða gjørdar innleiðandi fyrireikingar til gerð av hesum og verður arbeiðið sum útgangsstøði latið til verandi feløg/arbeiðstakarar á Vesturskýlisverkætlanini.

**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ TÓRSVØLL**
Kommunan og FSF eru í holt við undantilgongd til útbjóðing at skifta graslíkið og stoytdoyvingarlagið á Tórsvølli, umframt fyrireika at flyta sprinklarar. Ætlandi byrjar útboð medio februar 2021, og skal vøllurin skiftast medio juni 2021 og verða klárur at brúka til altjóða landsdystir primo august 2021.

Ætlandi verður útboðið av graslíki v.m. gjørt saman við útboðnum av graslíki v.m. til Niðara vøll, sí niðanfyri.

Arbeiðið við at umleggja sprinklaraskipan v.m. verður gjørt sum undirhondsboð við undanfarnum veitarum.

Í desember 2020 kom hitaskipanin á Tórsvølli at virka á fyrsta sinni, leiðingarnar vórðu lagdar í vøllin í 2012. Sbrt. samstarvssáttmálanum við FSF frá 2020 legði FSF út fyri tað arbeiðið í 2020.

Sbrt. sama samstarvssáttmála skal kommunan í 2021 rinda helvtina av kostnaðinum fyri hitaskipanina og nýggja graslíkið v.m. á Tórsvølli – tá mett til umleið kr. 2,5 mió til hvønn partin. Ongin peningur er játtaður til endamálið í 2021 í íløguætlanini hjá kommununi.

Kommunan og FSF hava fingið greining av stoytdoyvingarlagnum á Tórsvølli og staðfestir hon, at tað er ivasamt, um stoytdoyvingarlagið er í nøktandi standi til at vera endurnýtt til eina nýggja álegging. Nøkur pkt. uppfylla ikki nýggju krøvnini í FIFA Quality Pro standardinum frá 2015, og tí er ávísur váði í at lata tað vera á. Umsitingin og FSF meta, at hetta er ov stórur váði at taka, tí Tórsvøllur er einasti vøllur í Føroyum, sum kann hýsa A-landsliðskappingardystum, og tí krevst trygd fyri góðkenning. At skifta stoytdoyvingarlagiðhevur eyka kostna við sær.

Av tí at kommunan ikki hevur játtað fígging til hesi endamál í 2021 er neyðugt at umraðfesta í íløguætlanini fyri ítrótt (løgukontu 5775 Ítróttaranlegg) ella í øðruj lagi at útvega aðra játtan.

**VIÐV. VERKLØGUM VIÐ NIÐARA VØLL**
Kommunan er í holt við undantilgongd til útbjóðing at skifta graslíkið og stoytdoyvingarlagið á Niðara vølli, umframt fáa bøtt um undirlendið v.m. Ætlandi verður útboðið av graslíki v.m. gjørt medio februar 2021 saman við útboðnum av graslíki og stoytdoyvingarlagi til Tórsvøll, sí omanfyri.

FSF mælir kommununi til, at graslíkisvøllurin á Niðara vølli lýkur somu FIFA Quality Pro krøv sum Tórsvøllur, so at altjóða landsliðskappingar kunnu spælast á fleiri góðkendum vøllum á hægsta stigi í Havn. HB og B36 meta at tað er nøktandi at vøllur skal lúka FIFA Quality krøv, ið nøktar teirra tørv. Verður vøllurin FIFA Quality Pro, skal undirlendið gerast av nýggjum, t.e. planeringin og drensasfaltið, sum er gamalt.

Arbeiðið við undirlendinum verður ætlandi boðið út sum undirhondsboð til tveir veitarar.

Sbrt. fíggjarætlanini fyri 2021 eru á løgukontu 5775 Niðari vøllur/vøllurin á Argjum - játtaðar kr. 3 mió til Niðara vøll. Mett verður ikki gjørligt at endurnýggja graslíkið v.m. til Niðara vøll fyri hesa upphædd. Á fundinum kemur umsitingin at leggja fram eina meting/fíggjarætlan.

Umsitingin hevur saman við FSF havt samskifti við HB og B36 um ætlanirnar og tíðarætlanina. Semja er um at gera Niðara vøll fyrst og síðani Tórsvøll.

Sí hjálagt ætlaða tíðarætlan fyri verkløgini við Tórsvøll og Niðara vøll, og sí hjálagt skjal við kostnaðarmeting fyri ymsu verkløgini.

Um tað skal vera møguligt at fremja graslíkisverkætlaninirnar í 2021, er alneyðugt at fara undir útboð av graslíki v.m. til Tórsvøll og Niðara vøll medio februar 2021.

**FÍGGING**
Omanfyri nevndu arbeiði viðv. Ovara vølli, Niðara vølli og Tórsvølli eru ikki fult fíggjaði, hetta uttan mun til, um stoytdoyvingarlag v.m. verður skift ella ikki. Neyðugt er antin at útseta ávís arbeiði til 2022, um fígging tá verður útvegað, ella at fáa til vega tørvandi fíggingina á verandi íløguætlan á løgukontu 5775 Ítróttaranlegg ella í øðrum lagi at útvega aðra játtan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. (FIFA Quality Pro) til Tórsvøll, og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð.
b). At heimila umsitingini at bjóða út veiting av graslíkisveiting v.m. til Niðara vøll (antin FIFA Quality Pro ella FIFA Quality), og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð.
c). At flyta kr. 7 mió av løgukontu 5775 á L57031 - Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 22. februar 2021:** Ein meirluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkir at heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. FIFA Qualitiy Pro til Tórsvøll og til Niðara vøll FIFA Quality, og at samráðast við tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Harumframt samtykt at játta kr. 3 mió av løgukontu 5775 ætlað Niðara vølli til løgukontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur undir við meirilutanum, men tekur ikki undir við, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Hin 23. februar 2021 bað nevndarformaðurin nevndina um heimild at viðgera málið um fótbóltsvøllirnar 19/04413 á skrá í mentamálanevndini dagin fyri av nýggjum um tpost, sum formliga verður at staðfesta á næst komandi nevndarfundi.
Sum ískoyti varð skrivað: *Annfinn Brekkstein, formaður, skjýtur upp, at nevndin samtykkir at heimila umsitingini at bjóða út graslíkisveiting v.m. til tveir graslíkisvøllir og alternativt tríggjar vøllir, og at samráðast við tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð. Vísandi til, at støðan viðvíkjandi graslíkisvøllinum á Ovara vølli, sum varð lagt á í fjør, enn er óviss, er endamál við samtyktini at tryggja, at alternativt tilboð kann heintast inn samstundis sum hini báðir vøllirnir.*

Allir nevndarlimirnir góðkendu viðgerð um tpost í hesum føri. Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, tóku undir við uppskotinum. Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum vísandi til, at tað er ov tíðliga at avgera, at Ovari vøllur skal bjóðast út. Ein annar minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

3. mars 2021 byrjaði útboðið av veiting av graslíki v.m. til Tórsvøll, Niðara vøll og eisini Ovara vøll í Gundadali sum ein optión.

Licitatión verður 19. mars 2021. 3 feløg eru við í útboðnum. Æltandi kemur tilmæli um at taka av tilboðið til viðgerðar á býráðsfundinum 25. mars 2021.

Lendisarbeiðið við Niðara vøll byrjar væntandi primo apríl, so tað er klárt til primo mai tá álegging av stoytdoyvingarlagi ætlandi skal byrja, umframt onnur tilhoyrandi arbeiðir við vøllin. Arbeiðið at skifta graslíkið á Tórsvølli skal skipast eftir skránni fyri altjóða dystir í summar, og ætlast tí at byrja í fyrru helvt av juni og skal verða liðugt til ólavsøku.

Til verkløgini, tó ikki Ovara vøll, verður mett neyðugt at útvega 5.000 tkr. afturat, umframt verandi tøku fígging til verkløg í Gundadali 7.000 tkr. Í hesum verður ikki roknað við ljósverkætlanini á Ovara vølli, sum mett verður krevur aðra fígging. Sí hjálagda skjal við kostnaðarmetingum (skjalið kemur í first agenda mánadagin).

Skotið verður upp at útvega mettu restfíggingina til Niðara vøll og Tórsvøll á 5.000 tkr. av løgukontu 5775 soleiðis:
Stórhøll 1.000 kr.
Hoyvíksvøll 1.500 tkr.
Langhylur 2.500 tkr.

Viðv. ljósskipan í Gundadali
Umsitingin er enn í holt við kanningar um tilber at finna eina bílgari og nøktandi loysn. Stovnað verður nýtt mál og kemur tilmæli væntandi til fundin 14. apríl 2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 2.500 tkr. av projektkontu L57015 Svimjihøll, 1.000 tkr. av løgukarmi 5775 Stórhøll og 1.500 tkr. av løgukarmi 5775 Hoyvíksvøllur til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til mál 20/01962 Verkløg við Hoyvíksvøll, har ætlanin um fyribilshøli til felagsvirksemi har væntandi verður tillagað og størri í vavi eisini kostnaðarliga, verður mett neyðugt at broyta tilmælið omanfyri viðvíkjandi restfíggingini til verkætlanirnar í Gundadali/Tórsvølli.

Fyrisitingin skjýtur upp at játta tær kr. 5 mió av íløgujáttanini til langhylin, sum ikki kemur at brúka alla játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndina til at formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021, har heimild varð latin umsitingin at bjóða út graslíksveiting v.m.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at játta kr. 5 mió av projektkontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali.

**Mentamálanevndin 15. mars 2021:** Nevndin samtykti formliga at góðkenna viðgerðina og samtyktina, sum fór fram um tpost hin 23. februar 2021, har heimild varð latin umsitingin at bjóða út graslíksveiting v.m.

Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við tilmælinum um at játa kr. 5 mió av projektontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum frá meirilutanum í mentamálanevndini at játta kr. 5 mió av projektontu L57015 Svimjihøll til projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at íløgujáttan kr. 4 mió, sum ætlaðar eru til ljósmastrar á Ovara vølli, so hann lúkar krøv frá FSF, verða brúktar til graslíkið.

**Ískoyti:**
Inn komu trý tilboð, har tvey teirra luku treytirnar í útboðnum og tey teknisku krøv, ið útbjóðingartilfarið setti til graslíkið v.m. Útboðið var uppá Niðara vøll og Tórsvøll báðir við nýggjum stoytdoyvingarlagi, og sum optión eisini tilboð uppá triðja vøll bert graslíki.

Lægsta boð hevði Metatron/Polytan á 6.600.859 kr. uppá Niðara vøll og Tórsvøll. Triði vøllur vil sum útgangsstøði kosta samsvarandi eindarprísunum í tilboðnum (mett til 2.250.000 kr.).

Verandi Tórsvøllur er av merkinum Polytan, og vøllurin í tilboðnum er ein dagførd útgáva av hesum. Fleiri norsk stadion til tippuligafótbólt hava sama graslíki, men við ymsum samansetingum av ífyllu.

Tilboðið frá Metatron vísir eisini á eitt umhvørvisvinarligari granulat enn útbjóðingartilfarið leggur upp til. Metast má, at man í samráðingartilgongdini fær nærri kostnaðarmett umhvørvisvinarligu loysnina. Mett verður skilabest, at allir vøllirnar hava somu ífyllu. Í fall tað verður gjørt verður tað við avtaluseðlum.

Samráð hevur verið við feløgini í Gundadali um støðuna viðvíkjandi Ovara vølli. Kommunan hevur gjørt ymsar testir av vøllinum og hevur lagt meira granulat í vøllin. Hóast vøllurin hevur altjóða góðkenning, so meta feløgini framvegis, at vøllurin er ikki brúkiligur til elitufótbólt hvørki til heimligu kappingina ella til altjóða dystir. Talan er fyrst og fremst um upplivingina, har bólturin rullar óvanligt.

Feløgini mæla til, at Ovari vøllur verður skiftur fyrst, síðani Tórsvøllur og til síðst Niðari vøllur. Broytingin í raðfylgjuni av vøllunum verður tikin upp við veitaran í samráðingartilgongdini, samstundis sum at kommunan endurskoðar tíðarætlanina fyri arbeiðinum á Niðara vølli í ár.

Samráð hevur eisini verið við FSF um venjingar hjá Gundalsfeløgunum á Tórsvølli tíðarskeiðið, ið arbeitt verður uppá Ovara vøll.

Umframt kostnaðin fyri vøllin, eru kostnaðin fyri ráðgeving, mvg og ókent. FSF rindar sambært avtalu helvtina av kostnaðinum av Tórsvølli.

Sum lýst í málslýsingini til nevndarfundin 22. februar 2021, so eru aftrat graslíkisveitingunum onnur atknýtt arbeiði at gera. Hetta fevnir m.a. um sprinklaraskipanina á Tórsvølli, sum eisini bindur saman spinklaraskipanina á Ovara vølli, og nýggjar girðingar og umhvørvistiltøk kring Ovara og Niðara vøll, fríðkan v.m. Nú tríggir vøllir skulu skiftast væntandi allir í ár, verður neyðugt at dagføra samlaða metingina um fíggjartørv. Tøkar eru uml. kr. 12 mió.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um at heimila umsitingini til at samráðast og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevan (Metatron EHF/Polytan) um graslíkisveiting v.m. til Ovara vøll, Tórsvøll og Niðara vøll innanfyri ein karm uppá 8.850.859 kr., og útinna atknýtt arbeiði viðvíkjandi sprinkling, girðingum, umhvørvistiltøkum v.m. umframt ráðgeving og kommunalt mvg, at fíggja av projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Gundadali, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Elsa Berg, tekur undir við við mentamálanevndini og játtar kr. 12.000.000,00 av konto 5775 Ítróttaranlegg (7 mió. kr. ætlaðar til vøllir og 5 mió. kr. ætlaðar til langhyl).

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

## 88/21 Uppskot um avtalu millum Kommunufelagið og Nám um undirvísingartilfar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 165/19 | 18/03863-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 237/20 | 18/03863-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 279/20 | 18/03863-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 287/20 | 18/03863-5 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 14/21 | 18/03863-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 53/21 | 18/03863-5 |
| 7 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 88/21 | 18/03863-5 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot til heildaravtalu við Nám

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna og Kommunufelagið hava verið á fundi við Nám um avtalu um undirvísingartilfar. Við støði í tí fundinum gjørdi Nám upprit um samstarv millum Kommunufelagið og Nám. Eftir uppskotinum rinda kommunur/skúlar hald eftir næmingatali og fáa so atgongd til tilfarið, umframt at heildaravtalan eisini fevnir um ymsu KT-skipanirnar, ið skúlarnir rinda fyri. Ætlanin er, at avtalan handferð viðurskiftini í Skúlanum á Fløtum, sum nærum burturav hevur talgilt undirvísingartilfar.

Í samskiftinum hevur Nám boðað frá, at tey eru í holt við at útbyggja funktiónirnar í skipanini Kervi soleiðis, at hon longu til komandi skúlaár kann bjóðast ístaðin fyri Vitanet til handfaring av uppmøting, skema, skúlatingum o.ø. Breið undirtøka er fyri hesum millum skúlarnar og vil henda tænasta so seinni gerast partur av eini samlaðari avtalu.

Uppritið er ætlað sum grundarlag fyri at fara í samstarv/samráðingar um eina avtalu.

Uppskotið um samstarv er viðgjørt á regluligum fundi við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu. Sum er hevur Skúlin á Fløtum avtalu við Nám um talgilt tilfar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki at viðmerkja

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Upprit um samstarv millum Kommunufelagið og Nám er hjálagt.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at umsitingin fær heimild til saman við Kommunufelagnum at arbeiða víðari við ætlanini um avtalu um undirvísingartilfar.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar tingast við Nám um eina avtalu fyri tær tænastur, sum Nám veítir kommununum. Endaligt uppskot er gjørt, sí hjálagt skjal.

Hóast tað eru Kommunufelagið og Nám, sum hava arbeitt við at gera standardavtaluna, er tað einstaka kommunan, ið ger av, um hon ynskir at gera eina slíka avtalu við Nám, og tað er so einstaka kommunan, sum er sáttmálapartur mótvegis Námi.

Við í avtaluni eru tær pappírsbøkur og talgildar bøkur, ætlaðar fólkaskúlunum, ið Nám framleiðir og er einaútgevari av.
Tey talgildu amboðini, ið eru við í avtaluni eru hesi:

1. Talgildar bøkur
2. Talgild próvtøkuskipan (Wiseflow)
3. Samskiftisskipan (Microsoft office 365) umframt tænastu
4. Skemaleggingarskipanina (Gp Untis)
5. Umsitingarskipan - Kervið og FSG
6. Undirvísingarportalurin Snar
7. Tilfarsgrunnur (mitCFU).

Undirvísingarportalurin Snar er partur av avtaluni. Skipanin hevur annars verið tann, at kommunurnar rinda fyri Snar, og parturin hjá Tórshavnar kommunu er uml. 210 tkr. um árið,

Árliga gjaldið er:
1. Skúlaárið 2021/2022 – 1020 kr./næming
2. Skúlaárið 2022/2023 – 1100 kr./næming
3. Skúlaárið 2023/2024 – 1150 kr./næming

Goldið verður síðst í september og fyrstu ferð tann 30. september 2021, ið er gjaldið fyr skúlaárið 2021/2022

Kommunufelagið ger vart við, at tað sum so ikki hevur góðkent prísin, tí felagið ikki hevur faktuelt grundarlag til at seta spurnartekin við, um útrokningargrundarlagið hjá Námi er á eini leið ella ikki.

Nýggj fígging krevst til at kunna undirskriva avtaluna.

Sáttmálaskeiðið er trý ár, og sáttmálin er galdandi fyri skúlaárið eftir, at undirskrivað er. Sáttmálin kann tó uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaða freist.

Ætlanin er at senda skúlaleiðarunum avtalauna og viðgera hana á fundi við teir hósdagin 1. oktober, og síðani leggja hana fyri mentamálanevndina aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða hjálagdu avtalu um undirvísngartilfar, aðrar talgildarloysnir og undrivísingarportalin Snar.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Endaliga uppskotið til avtalu við Nám um undirvísingartilfar, talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar varð viðgjørt á fundi við skúlaleiðarar hósdagin 1. oktober.
Skúlaleiðarar er ikki heilt samdir um, Tórshavnar kommuna eigur at gera henda sáttmála. Teir ynskja, at nøkur viðurskifti verða viðgjørd betur, her hugsa teir serliga um, at avtalan bindur ikki Nám at geva út nýtt tilfar, og at sum heild eigur undirvísingartilfar ikki at vera eldri enn 10 - 15 ár. Haraftrat fara skúlar at rinda nakað meir til Nám, enn teir gera í dag.

Í § 9 stendur: "Ráðgevandi bólkur við umboðan úr Kommunufelagnum, trimum skúlaleiðarum og umboðan frá Námi, møtist minst 2 ferðir árliga at umrøða og viðgera viðurskiftini í hesum sáttmála. Bólkurin umrøður og viðger m.a. útgávuætlanir hjá Námi á fólkaskúlaøkinum, hvørjum útgávum tørvur er á, hvussu talgildu amboðini virka og møguliga kunnu mennast, og metir annars áhaldandi um tær tænastur, ið skúlarnir fáa við hesi skipan, og viðger, hvussu møguligar tillagingar kunnu gerast."

Skúlaleiðarar meta, at ráðgevandi bólkurin eigur eisini at hava heimildir at taka avgerðir saman við Námi um, hvat kemur út, og hvussu játtanin hjá Námi verður brúkt í sambandi við nýggjar útgávur.

Mentamáladeildin fer at seta seg í samband við Nám aftur at vita, um tað ber til at gera eitt fylgiskjal til sáttmálan, sum staðfestir, at tilfarið frá Námi er dagført, og at útgávur ikki verða ov gamlar, áðrenn nýtt tilfar kemur. Síðani er ætlanin at leggja málið fyri mentamálanevndina aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða hjálagdu avtalu um undirvísngartilfar, aðrar talgildarloysnir og undrivísingarportalin Snar.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur eftir ynski frá skúlaleiðaranum í fólkaskúlunum sent Námi skriv um at fáa nakrar broytingar við í avtaluna, tær eru viðvíkjandi endurnýggjan av tilfari og nýggjum útgávum. Svarið frá Námi er, at tey treyðugt gera broytingar nú. Kommunur hava skrivað undir avtaluna, og tað ber ikki til at gera serliga avtalu við Tórshavnar kommunu. Nám metir haraftrat, at § 9 í avtaluni leggur upp fyri, at tilfar ikki verður ov gamalt, at tilfar verður dagført, og at nýtt tilfar kemur út.

Nám var við á fundi við skúlaleiðarar tann 7. januar í 2021, har stovnurin greiddi frá svarinum til Tórshavnar kommunu, og at Tórshavnar kommunu er so stór, at einki er at ivast í, at hon verður umboðað í ráðgevandi bólkinum, sum sambært avtaluni m.a. skal umrøða og viðgera, hvørjum útgávum tørvur er á, hvussu talgildu amboðini virka og kunnu mennast, bólkurin skal eisini meta um tær tænastur, ið skúlarnir fáa við hesi skipan og viðgera, hvussu møguligar tillagingar kunnu gerast.

Skúlin a Fløtum er talgildur og brúkar ikki so nógvar pappírsbøkur. Skúlin hevur havt eina avtalu við Nám um talgilt tilfar, men tann avtalan er ikki galdandi longur, og Nám fer ikki at gera serskilda avtalu við Skúlan á Fløtum um tilfar. Skúlin á Fløtum hevur gjørt vart við, at tað, at hann ikki brúkar so nógvar pappírsbøkur, hevur givið pláss í játtanini til skúlan til kt-útgerð og amboð. Skúlin fer ikki at hava sama møguleika longur, tí sambært uppskotinum til avtalu um undirvísingartilfar, aðrar talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar millum kommunur og Nám fer, hvør skúli at rinda fastan prís fyri hvønn næming, og tí ber ikki til at spara her.

Skúlarnir taka sum heild undir við, at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám, sum so verður galdandi í trý ár.

Játtan er sett av til undirvísingarportalin Snar, sum Nám umsitur. Ein avtala er millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Kommunufelagið um undirvísingarportalin, og sambært henni útvega kommunurnar og Uttanríkis- og mentamálaráðið fígging til undirvísingarportalin, kommunan rindar ávísa upphædd fyri hvønn borgara í kommununi. Í 2021 eru 210.000 kr. játtaðar á 4141 Undirvísingarportalur. Um samtykt verður at skrivað undir avtaluna við Nám, verður undirvísingarportalurin partur av avtaluni og kostnaðinum, og tí verður mælt til at flyta teimum 10 kommunalu fólkaskúlunum hesa játtan og býta hana eftir næmingatali.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a). at Tórshavnar kommuna skrivar undir avtaluna við Nám

Um samtykt verður at skriva undir avtaluna mæla trivnðaðarstjórin og mentamálaleiðarin trivnaðarnevndini til samtykkja:

b). at játtanin á 4141 Undirvísingarportalur verður flutt á játtanirnar hjá teimum 10 kommunalu fólkaskúlunum og verður býtt eftir næmingatali.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt samtykt at tryggjað verður, at tilfarið eisini kann nýtast til hjálpiforrit í sambandi við orðblindni v.m. samstundis sum bókaútgávan, og at skúlarnir verða tiknir við í eftirmetingina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

## 89/21 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 13/20 | 20/00622-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 61/20 | 20/00622-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 31/20 | 20/00622-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 128/20 | 20/00622-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 24.06.2020 | 16/20 | 20/00622-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 42/21 | 20/00622-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 18/21 | 20/00622-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 57/21 | 20/00622-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 89/21 | 20/00622-1 |
| 10 Býráðsfundur | | | 20/00622-1 |

**Upprunin til málið:**
Bygging á Karlamagnusarbreyt er komin væl ávegis, og eru flestu økini bygd ella er bygging í gongd. Sum økið við Karlamagnusarbreyt nærkast at verða liðugt, vísir tað seg at nógvar avbjóðingar eru í økinum. Økið er sera tætt bygt, og er týdningarmikið at tær ymisku avbjóðingarnar verða loystar í einari heildarætlan.

Tí er avgjørt at umsitingin fer undir eina tilgongd saman við borgarunum og áhugaðum í økinum fyri at gera eina tillagaða heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin er farin undir eina tilgongd, har endamálið er, at ein tillagað heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt verður gjørd.

Økið við Karlamagnusarbreyt hevur í verandi støðu fleiri avbjóðingar. Avbjóðingarnar kunnu í høvðusheitum deilast upp í trý evni: ógreið parkeringsviðurskifti, ringar umstøður til gongu- og súkkluferðslu og manglandi fríøki til borgararnar.

Heildarætlanin skal bæði vísa á loysnir uppá tær nágreiniligu avbjóðingarnar í økinum, men hon skal eisini koma við einum boði uppá hvussu økið kann fríðkast og Karlamagnusarbreyt kann gerast ein grøn og vøkur býargøta við trivnaði í hásæti.

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt uppá at greina tær veruligu avbjóðingarnar í økinum og hevur eitt boð uppá møguleikar fyri at loysa hesar avbjóðingarnar.
Í hesum sambandi verður farið undir eina tilgongd saman við borgarunum í økinum og teimum sum hava sína dagligu gongd í økinum. Tey eru boðin inn til verkstovur, har tey fáa møguleikan at vísa á teirra fatan av hvørjar avbjóðingar og hvørjir møguleikar eru fyri loysnum.

Aftaná at verkstovurnar hava verið, samlar umsitingin heildarætlanina fyri Karlamagnusarbreyt, við støði í loysnum sum hava verið viðgjørdar á verkstovunum við borgarar í økinum.
Heildarætlanin verður í framtíðini grundarlag fyri menning av økinum við Karlamagnusarbreyt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
20/00622-5 Viðmerkingar frá borgarum
20/00040-1 Skipan av økinum kring Hoyvískvøll
20/00622-7 Parkeringstørvur
20/00622-8 Kostnaðaryvirlit – ikki endaligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Orsakað av koronasmittu, vórðu allar borgaraverkstovurnar avlýstar og ístaðin varð skipað fyri einari talgildari borgaraluttøku, har borgarar fingu møguleikar at siga teirra meining um Karlamagnusarbeyt og koma við ynskjum til betringar. Talgilda luttøkan lá opin í 3 vikur, og komu svar frá 233 borgarum.
70 frá íbúgvum á Karlamagnusarbreyt, 127 frá íbúgvum í búgva í grannalagnum og 36 frá fólki aðrastaðni í kommununi.

Nógvar viðmerkingar vóru afturvendandi. Allar viðmerkingarnar eru skrásettar og flokkaðar (sí skjal 'viðmerkingar frá borgarum'). Út frá hesum og vitan, sum kommunan longu hevur um øki, eru serliga fýra evnir, ið ganga aftur.
Hesi evnini eru við til at skapa grundarlagið í uppskoti til endurskoðan av Karlamagnusarbreyt 20/00622-7 Plantekning 05.06.20

- **Parkering**

  Tá alt er bygt liðugt á Karlamagnusarbreyt er tørvur á uml. 600 p-plássum. Verandi øki, ið eru avsett til parkeringspláss rúma uml. 580 pláss (sí skjal 20/00622-7 parkeringstørvur. Parallell- og lodrættparkering er teknað inn á øll øki har, sum pláss er fyri at venda einum bili. Millum bygningarnar,

har parkering ikki rúmast, er grøn fríøki teknað inn. Í uppskotinum hava øll parkeringspláss grønar eindir, so sum gróðurseting við innkoyringarnar og summi hava grasarmering.
Sum nú er, eru øki til rusk ikki skipað á økinum. Ruskinnsavningin hevur gjørt vart við, at ruskbilurin hevur avbjóðingar við at sleppa til felags ruskøkini. Tískil eru felags ruskstøðir teknaðar inn á tvey tey fyrstu p-plássini á 12 parkerings økjum javnt býtt niðaneftir Karlamagnusarbreyt. Hugskotið er, at allar ruskstøðirnar skulu vera eins og vera eitt estetiskt íkast til økið.

- **Gøtu og gonguleiðir**

Gonguteigar eru gjørdir millum allar bygningarnar og fram við allari Karlamagnusarbreyt. Harafturat eru snargøtur ætlaðar fyri at binda ymsu økini saman, skapa trygd frá bilum og fyri at skapa styttri leiðir til t.d. bussin.

- **Vegurin Karlamagnusarbreyt**

Allur vegurin skal skipast av nýggjum. Ætlanin er at skipa vegin við einvegis ferðslu, soleiðis at tað einans verður loyvt at koyra niðaneftir. Ferðsluforðingar, sum eru gróðursettar á vegnum, verða gjørdar fyri at raðfesta trygdina hjá fólki, ið ikki eru í bili. Neyðugt verður við parkering fram við vegnum í støðum. Og av tí at ferðslan er einvegis verður hetta ikki ein trupulleiki, tí vegurin er nóg breiður.

- **Fríðkan og umskapan av økinum í mun til trivna**

Fyri at skapa litir og ein øðrvísi dám í økinum, er ætlanin at gróðurseta við innkoyringina millum allar bygningarnar, á vegunum sum ferðsluforðingar og í skráum við Bertrugøtu, Maritugøtu og millum Ingibjargargøtu/Torkilsgøtu.
Harafturat verður tað gróðursett millum øll øki har, sum tað hóskar.
Uppskot til skipan av Hoyvíksvølli er gjørt, og sent til hoyringar hjá avvarðandi feløgum og felagsskapum. Økið við Hoyvíksvøll er m.a. skipað við inngongd til vøllin, einari sititrappu til áskoðarar, einum felagshúsi/skýli og parkeringsøki (sí skjal 20/00040 plantekning - Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll).
Ynskiligt er at skipa økið framman fyri Hoyvíkar Kirkju sum eitt alment torg, sum borgarar kunnu brúka til uppihald og felagsátøk.

**Skjøl:**
20/00622-5 viðmerkingar frá borgarum
20/00622-7 parkeringstørvur
20/00622-7 Plantekning 05.06.20
20/00040-2 plantekning – skipan av økinum kring Hoyvíkvøll

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla teknisku nevnd og býarskipanarnevndini til:
1. at umrøða uppskot til heildarætlanina
2. at koyra uppskotið til heildarætlan út til almenna hoyring
3. at tillagaða heildarætlanin skal leggjast fyri aftur til politiska støðutakan, tá hon er tillagað í mun til innkomnar viðmerkingar.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 24. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Heildarætlanin varð framløgd á borgarafundi á skúlanum við Løgmannabreyt í okt. 2020. Nógv fólk var til borgarafundin, og nógvar viðkomandi viðmerkingar vóru til ætlanina.
Heitt varð á íbúgvararnar í økinum um at skipa seg í eigarafeløg fyri tey 6 økini, sum Karlamagnusarbreyt er skipað eftir, soleiðis at samskifti millum kommunu og borgararnar í økinum er umboðandi áhugan í

økinum. Skriv er eisini sent út til umboð fyri økini, um at royna at skipa seg í eigarafelag, ella at velja umboð fyri hvørt øki, at hava samskifti við kommununa um ymisku felags viðurskiftini.
Á borgarafundinum varð serliga gjørt vart við manglandi parkeringsplássini í økinum. Tikið varð ikki undir við loysnini at gera parkering og gjøgnumkoyring við Hoyvíkar skúla. Heldur varð heitt á Býráðið um at taka nøkur stykkir innaftur, soleiðis at parkeringstørvurin minkar, og at parkeringin kann skipast á innafturtiknu stykkjunum. Gjørt varð eisini vart við tørvin á felagsøkjum og fríðkan í økinum, at gera tryggari skúlaleiðir. Tikið varð ikki undir við at einsrætta Karlamagnusarbreyt, víst varð á trupulleikarnar við hesi loysn.
Borgarar í økinum hava síðani heitt á kommununa um at fyrireika økið, so at løðistøðir til el-bilar lættliga kunnu fremjast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.
Somuleiðis hava borgarar víst á at ruskinnsavningin er óskipað, og somuleiðis hevur ruskinnsavningin gjørt vart við, at tørvur er á at fáa skynsama loysn til bingjur í økinum, til burturkast, glas og papp.

Aftaná fundin varð farið undir átøk at betra um skúlaleiðir hjá børnum og at fríðka um økið.
- Gøta javnfjar millum Karlamagnusarbreyt og Bertugøtu er framd.
- Gróðurseting við Myllutjørn er framd.
- Gróðurseting við parkeringsøki er framd
Harumframt eru fleiri reinsiverk gjørd, at betra um kloakkskipanina í økinum.

Ferðsluserfrøðingar gjørdu í desember ferðslukanningar og gjørdu uppskot til hvørjar ferðsluloysnir hóska best til økið. *Sí skjal J. Nr. 20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf*

Umsitingin hevur tillagað heildarætlanina, við støði í viðmerkingum á borgarafundinum, sí skjal *20/00622-30 KMB samlað* og *20/00622-30 Framløga politiska viðgerð 2021* og mælir til hesi átøk:

- Aftaná borgarafundin hevur Býráðið keypt 2 stykkir aftur, sum parkering kann skipast á. Á hetta økið fáast uml 85 parkeringspláss, og eigur hetta at vera sett í verk beinanveg. Møguligt er at fáa fleiri parkeringspláss á økið, umframt at økið kann innrættast til eitt felagsøki, men hetta krevur at økið verður raðfest sum ein verkætlan.
- Innkoyringin til Skúlan á Løgmannabreyt verður umskipað, soleiðis at sýnið verður betri, og parkeringin verður eisini umskipað.
- Vegurin verður 30 km/t vegur, og verður skipaður, soleiðis at gongubreyt er á báðum síðum, gøtuljós verða sett í gongubreytarkantin, súkklur og bilar deilast um vegbanan, 2 minus 1, og við vegamót verða 'rumlur' við chaussesteinum ella líknandi, so mint verður á at halda lága ferð, umframt at plantað og fríðkað verður á økinum.
- Vegurin verður ikki einsrættaður, men innkoyring bannað frá vegamótinum Skúlin á Løgmannabreyt omaneftir. Hetta fyri at fáa ovaru økini í Hoyvík at koyra omaneftir Løgmannabreyt heldur enn gjøgnum Karlamagnusarbreyt. (hetta er eitt ynski frá borgarum í økinum).
- Dragirør verða løgd til øll parkeringsøki, so nøktandi ljós kann tryggjast í økinum.
- Spæli- og trivnaðarøki verða gjørd.
- Farleiðir og gøtur verða gjørdar at bøta um skúlaleiðirnar.
- Fleiri øki, serliga tey, ið ikki kunnu rúma parkering, verða løgd við grasarmering heldur enn asfalt, fyri at fríðka um.
- Uppskot er gjørt til standardleist, at skipa ruskøki við øll parkeringsøki, sum eigarar eiga í felag. Vatn og frárenningar skulu leggjast til hesi øki, ið eisini kunnu fyrireikast til postkassar og framtíðar talvur til el løðistøðir.
- Støða skal takast til, um hendan loysnin skal góðkennast av eigarafeløgunum, hvussu hetta kann skipast og hvør skal gjalda fyri felags skipanina.
- Ynskir Tórshavnar kommuna at gjalda fyri hesa loysnina fyri eigarafeløgini, um tey taka undir við teimum.
- Dragirør verða løgd í tey økini sum ikki eru asfalterað, soleiðis at billøðistøðir lættliga kunnu setast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.

Parkeringin:

Við hesum uppskotinum fáast 503 parkeringspláss afturat teimum 91, sum hoyra til Skúlan við Løgmannabreyt.
Sambært givnum byggiloyvum higartil, er tørvur á 464 parkeringsplássum.
Tá ið alt økið er fult útbygt, verður tørvur á 525 parkeringsplássum at nøkta krøv sambært byggisamtyktini. Hesin tørvur kann røkkast, um afturkeyptu matriklarnir verða innrættaðir við einum parkeringshúsi ella við einum parkeringsdekki.

Fleiri av omanfyri nevndu átøkunum kunnu metast sum Skjótt Syftir Seiðir, og kunnu setast í gongd skjótt.

Størri átøk ella Tyngri Tøk eru eisini neyðug í sambandi við liðugtgerð av Karlamagnusarbreyt, og skulu loysast og prosjekterast sum serstakar verkætlanir.

Av hesum kunnu nevnast:
- Torg til Hoyvíkar kirkju.
- Parkeringshús/borgarahús/felagshús á afturkeyptu stykkjunum.
- Trivnaðarøki við Atlagøtu.
- Farleið gjøgnum grøna geiran millum fótbóltsvøllin og Atlagøtu.

Av omanfyrinevndu átøkunum verður mælt til beinanvegin at fara undir tey átøkini, sum eru serliga átrokandi og kunnu lýsast sum Skjótt Syftir Seiðir.

Hesi eru:
- Umskipan av innkoyring við Skúlan við Løgmannabreyt, og skipan av parkering og fríðkan á økinum.
- Inn- og útkoyring frá Atlagøtu til Bónus
- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Gongubreytir frá Atlagøtu til Skúlan við Løgmannabreyt, (vegur 2 og 3)
- Dragirør og fyrireikingar til framtíðarloysnir í sambandi við asfaltering.

Heildarætlanin er ikki prosjekterað, og kostnaðarmeting er ikki gjørd av arbeiðinum. Mælt verður til at 8 mió. verða settar av til arbeiðið í 2021.

Skjøl:
20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf
20/00622-30 KMB Samlað
20/00622-30 framløga politiska viðgerð 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at
1) tikið verður undir við heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt,
2) seta átøkini nevnd sum “Skjótt Syftir Seiðir” í verk,
3) játta kr. 8 mió. til verkætlanina, skipað og fíggjað soleiðis:
   a) Øll verkætlanin verður skipað undir konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
   b) Kr. 3.000.000 verða fluttar av konto 6275, L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, á konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
   c) Kr. 900.000 verða fluttar av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur
   d) Kr. 4.150.000 verða fluttar av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið
4) Beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við fyrstu viðgerð við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Ruth Vang og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

# 90/21 Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 161b, 185c og 156, Tórshavn. undir Bryggubakka og Rektaragøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 166/17 | 17/01760-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 197/17 | 17/01760-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 134/18 | 17/01760-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 85/20 | 17/01760-5 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 38/20 | 17/01760-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 225/20 | 17/01760-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 247/20 | 17/01760-5 |
| 8 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 322/20 | 17/01760-5 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 14/21 | 17/01760-5 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 31/21 | 17/01760-5 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 55/21 | 17/01760-5 |
| 12 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 90/21 | 17/01760-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
SNA Arkitektar søkja vegna eigaran, um byggiloyvi at gera hotellíbúðir á omanfyri nevndu ognum.

Á niðastu hæddini verður útvent virksemi og parkeringskjallari og á teimum ovaru hæddum 13 hotelíbúðir.

Talan er 4 samanbygdar lonir við saðiltekjum, sum eru sneiddar 90° í mun mun til verandi bygging í røðini.

Umsøkjarin vísir á, at til ber at minka um skuggaárinini á sethúsaøki eystanfyri, við sneiðingini og vil tað tæna sethúsaøkinum eystanfyri.

Hæddin á bygninginum er ásett í mun til hægsta punkt á vegnum við tað norðasta matrikulmarkið.

Ein geiri við einari trappu verður millum bryggjuna og Rektaragøtu sum kemur at knýta reyni og bryggjuna saman.

Inngongdir til íbúðirnar verða bæði frá Rektaragøtu og trappuni.

Sí annars frágreiðing í umsóknartilfarinum

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

<u>Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, §3:</u>

*2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tilíkt.*

<u>Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:</u>

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna

a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Viðv. mønuni:
Ásetingin er púra greið við hvønn veg mønin eigur at venda. Tað sum tó kann tala fyri at mønan verður sneidd 90 stig, er, at skuggaárini á bústaðarøki eystanfyri verður minni og bygningurin tykist opnari.

Viðv. parkeringsplássum:
Tað er ikki ynskiligt, at økja um ferðsluna eftir bryggjuni í Vágsbotni, heldur tvørtur ímóti. Útvenda virksemið í økinum er ætlað fólki og ikki bilum. Talið av parkeringsplássum í krevst sambært bygningskunngerðini 2017, rúmast ikki á ognini og í og tískil mugu nøkur parkeringspláss finnast aðrastaðni. Fyribils verður víst til Skálatrøð og annars almenn parkeringspláss í økinum. Á niðastu hæddini vera tó nøkur parkeringspláss.

Viðv. byggiøkinum:
At bygt verður út um byggiøki er natúrligt í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju.
Byggiøkini eru teknaði fyrst í 70-árunum og eru, at síggja til, tillagað táverandi sjólinju. Í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukant enn áður.

Viðv. hæddini:
Tá talan er um fleiri matriklar er vanligt, at hæddin verður ásett í mun til hægsta punkt á vegnum (Rektaragøtu) út fyri hvønn einstakan matrikul.

Verða matriklarnir 168b, 168a, 161b, 185c og 156 harafturímóti lagdir saman, er støðan ein onnur og hæddin verður í tráð við beinleiðis orðingina í byggisamtyktini.

Um verkætlanin skal bera á mál, má kommunan játta at selja uml. 45 m$^2$ burturav matr. nr. 201.

Serstaka byggiráðið kemur við sínum tilmæli mánadagin 11. september, og verður tað lisið upp á fundinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
1. Mønurnar venda skeivan veg
2. Byggingin fer út um byggiøki í fylgiskjalið IV
3. Hæddin er ásett í mun til norðasta hornið á matr. nr. 168a
4. Nøgd av parkeringsplássum er ikki nøktandi í mun til ásetingarnar í kap. 2 í Bygningskunngerðini 2017.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisflokking 1

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Vísandi til ásetingina um at møn skal liggja javnfar við vegin, vil býarskipanardeildin vísa á, at talan er um eina býarskipanarliga linju, ið er løgd út eftir økinum frá innasta til uttasta bygning. Ásetingin leggur upp til, at bygningarnir eru partur av einum framhaldandi strekki og heild - við at tekjurnar hava sama rætning, har uppskotið víkir frá við at bróta hetta mynstrið og heildarmyndina.

Harafturat verður víst á, at framsíðurnar á Rektaragøtu minna kanska ov nógv um bústaðarbyggingina í býlingunum Inni á Gøtu og Millum Gilja í Hoyvík, har ynskiligt er, at størri samanhangur er millum uppskotið og bygningarnar í nærumhvørvinum. Á fundi við arkitektarnar var hetta tikið upp, og vildu teir arbeiða víðari við hesum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**

**Skjøl**
17/01760-4 “Rektaragøta/undir Bryggjubakka – Lýsing av verkætlan”
17/01760-1 “0826_001” – Flatmyndir
17/01760-2 Kortmynd – lutur av matr. nr. 201

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at kommunan vil selja part av matr. nr. 201 til umsøkjaran og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur.
Eisini verður mælt til, at málið viðvíkjandi møguligum parkeringskjallara undir vegnum verður at viðgera serskilt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Málið umrøtt og verður tikið uppaftur á komandi fundi, tá umsitingin hevur havt fund við Reynanevndina.

**Iskoyti:**
Á fundi í Posthúskjallaranum tann 19.10.2017, varð verkætlanin løgd fram fyri nærmastu grannum, sum er íbúgvar úti á Reyni, eystanfyri ætlaðu bygging.

Grannarnir eru greiðir yvir, at talan  er um eitt byggiøki og at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn bygt verður á staðnum.

Teir meta, at fyriliggjandi ætlan í útsjónd og funktión er snøgg og tiltalandi og ynskja at mønurnar venda vinkulrætt heldur enn javnfjart við Rektaragøtu.

Tá tað er sagt, vísa teir á, at bygningurin er lutfalsliga alt ov høgur og stórur í vavi í mun til umliggjandi øki sum heild.

Eisini vísa teir á, at grøna økið og nærmastu sethúsini koma at liggja í óneyðuga nógvum skugga orsakað av hæddini.

Teir meta, at tulkingin av hæddarásetingini er púra burturvið og als ikki í tráð við intentiónina í serstøku byggisamtyktini, sum teir meta heldur leggur seg upp at hæddunum á bygningunum innast í Vágsbotni (Poul Hansen, Lutzen v.m.).

Grannarnir heita staðiliga á kommununa um at umhugsa verkætlanina sera gjølla, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

**Skjøl (5 visualiseringar)**
17/01760-14  Frá Vestaru bryggju
17/01760-14  Aftan frá norðuri
17/01760-14  Aftan frá suðuri
17/01760-14  Tinganes úr erva
17/01760-14  Frá SNA á Landavegur 9

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017**: Samtykt at ganga umsóknini á møti, treytað av at kommunan vil selja part av matr. nr. 201 til umsøkjaran, at snið og útsjónd verður gjørd í samráð við býararkitektin, at parkeringsviðurskiftini verða loyst og annars við treytum sum umsitingin setur.

Eisini samtykt, at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá omanfyri nevnda er loyst og at málið viðvíkjandi møguligum parkeringskjallara undir vegnum verður at viðgera serskilt.

Helena D. á Neystabø luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar hjá nærmastu grannunum eystanfyri ætlaðu bygging. Freistin at koma við viðmerkingum var úti tann 23. mai 2018, og hevur kommunan móttikið felags hoyringsskriv frá øllum teimum hoyrdu grannunum, seks í tali. Viðmerkingar teirra verða nú viðgjørdar og niðurstøðan hjá umsitingini verður klár til fundin 30. mai 2018.

**Nýggj skjøl**
17/01760-19  Dagførdar síðumyndir – «Tjaldur – Sheet – 03 – Síðumyndir»
17/01760-25  Fyribils hoyringssvar
17/01760-25  Fyribils hoyringssvar (003)
17/01760-20  Grannahoyringsskriv, sent grannum 03.05.2018
17/01760-24  Supplerandi upplýsingar sendir grannum 18.05.2018
17/01760-26  Viðgerð av hoyringssvarunum

**Tilmæli:**
Vísandi til at viðgerðin av viðmerkingunum frá grannanum ikki er liðug, kemur tilmæli á fundinum.

**Tilmæli:**

Vísandi til at býráðssamtykt frá 14. desember 2017 um sølu av parti av matr. nr. 201 og at umsitingin arbeiðir við eini heildarætlan fyri miðbýin, sum eisini umfatar parkerings- og ferðsluviðurskiftini, mæla virkandi tekniski stjórin og virkandi leiðarin á byggideildini til at ganga umsóknini á møti, treytað av at snið og útsjónd framhaldandi verður gjørd í samráð við býararkitektin og umsitingina, at arbeiðið at loysa parkeringsviðurskiftini heldur áfram og annars við teimum treytum sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umframt tað, sum omanfyri er samtykt, umfatar verkætlanin eisini, at partur av niðastu hæddini kemur at liggja úti undir vegnum Rektaragøta., uttanfyri matrikulmark. Vegurin er kommunal ogn. Hesin parturin av verkætlanini er ikki viðgjørdur av byggi- og býarskipanarnevndini áður.

Talan er um uml. 213 fermetrar sum er eystari partur av kjallarahæddini.

Kommunan hevur áður givið loyvi til líknandi útbygging á matr. nr. 180c, Bryggjubakki 8, har loyvi varð givið til útbygging í tveimum hæddum inn undir vegin Bryggjubakki.

Ein slík útbygging kemur í byggitíðarskeiðinum at viðføra, at Rektaragøta verður stongd fyri ferðslu og tískil má onnur loysn finnast í mun til atkomu til Reyngøtu og tær ognir, ið har liggja.
Av tí at grannar eystanfyri verða beinleiðis ávirkaðir av verkætlanini, má kommunan tryggja sær, at hesir grannar geva sítt samtykki og at arbeiðið verður framt í samráð við teir, sí fylgiskjal 17/01760-42 - Bygging inn undir Rektaragøtu – Støðumynd og flatmynd.

Um tað ber til at finna nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysnir í økinum, umframt at neyðug atlit verða tikin í mun til nærmastu grannarnar, metir umsitingin ikki, at nakað er til hindurs fyri at ætlanin kann lata seg gera.

Tað fyriliggur í løtuni eingin neyv tíðarætlan fyri byggingina og skal ein slík fyriliggja, áðrenn arbeiðið byrjar.

Eisini er neyðugt at kommunan ger leigusáttmála við eigaran um nýtslu av undirlendinum undir vegnum litra l og er neyðugt at fáa neyvari lýsing av víddini á hesum øki í tí sambandi.

Tekniska deild viðger í løtuni uppskot um ferðsluloysn, sum byggiharrin hevur latið kommununi, okkara mál nr. 20/01126

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 14/00242
Umsókn um góðkenning av dispositiónsuppskoti, Poul Hansen, heilsøla í Vágsbotni

Í hesum máli var samtykt at loyva útbygging í tveimum hæddum inn undir vegin á Bryggjubakka.

**Skjøl:**
17/01760-42 Bygging inn undir Rektaragøtu – Støðumynd og flatmynd
17/01760-38 Myndugleikaprosjekt – «HUB_K01_F2_N01»
17/01760-38 Umsókn – «K01_C04.1_UMSÓKN hotel Tórshavnar Kommuna»
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar (003)
17/01760-20 Grannahoyringsskriv, sent grannum 03.05.2018
17/01760-26 Viðgerð av hoyringssvarunum

17/01760-8 Viðmerkingar frá serstaka byggiráðnum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva útbygging inn undir vegin Rektaragøta treytað av:

- at ein nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysn til ognirnar í Reyngøtu verður funnin.
- at arbeiðið, sum hevur beinleiðis ávirkan á nærmastu privatu ognirnar, verður framt í samráð við hesar eigarar.
- at allar kommunalar leiðingar í Rektaragøtu verða gjørdar aftur uttan kostnað fyri kommununa.

Og annars við teimum treytum, sum umsitingin setir og at beina málið í teknisku nevnd og fíggjarnevndina til støðutakan viðvíkjandi leigu av undirlendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur higartil verið jaliga sinnað í mun til bygging inn undir vegin Rektaragøta og málið er viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini, har tað er samtykt, at loyva byggingini við hesum treytum:

1. at ein nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysn til ognirnar í Reyngøtu verður funnin.
2. at arbeiðið, sum hevur beinleiðis ávirkan á nærmastu privatu ognirnar, verður framt í samráð við hesar eigarar.
3. at allar kommunalar leiðingar í Rektaragøtu verða gjørdar aftur uttan kostnað fyri kommununa.

Og annars við teimum treytum, sum umsitingin setir.

<u>Ad 1</u>
Sløkkiliðið hevur verið á staðnum og kanna um tað er gjørligt, at sleppa ígjøgnum Gongina og haðani niðan á Reyni við sløkkibilum teirra. Niðurstøðan var, at tað er gjørligt treytað av, at absolutt einki stendur í vegin. Væntast kann tískil at oljubilar og onnur akfør eisini sleppa framat, men at talan er um eina heldur ivasama loysn.

<u>Ad 2</u>
Selmar Nielsen Arkitektar, SNA, hava sett seg í samband við nærmasta granna matr. nr. 169. Grannin eru tó ikki jaliga sinnaður í mun til ætlanina og metir, at verkætlanin ikki kann fremjast uttan at ogn hansara verður beinleiðis ávirka.

SNA hava síðan minkað byggingina soleiðis, at frástøðan til nærmastu grannaognir verður 1 m.

30. oktober 2020 var umsitingin á einum fundi við tveir grannar, matr. nr. 169 og matr. nr. 146.

Teirra støða er greið og meta teir tað vera órealistiskt, at arbeiðið á vegaøkinum kann fremjast uttan at ognir teirra verður skaddar so ella so, óansæð um frástøðan verður økt ella ikki. Tey eru ikki áhugaði í endurgjaldi, at garðar verða endurbygdir ella hvat tað mátti verið, ið byggiharrin bjóðar.

<u>Ad 3</u>
At byggiharrin ber kostnaðin av møguligum umleggingum av leiðingum v.m. verður sett sum ein treyt í byggiloyvinum.

<u>Fundur og skriv frá granna</u>
Grannin á matr. nr. 169, hevur sent kommununi eitt skriv, dagfest 19. oktober 2019, okkara mál nr. 20/04019-1, har víst verður á, at kommunan ikki hevur heimild til at geva loyvi til hotellíbúðir í økinum. Harumframt verður víst á ymisk onnur viðurskiftir s.s. áseting av hædd, bygging inn undir Rektaragøtu, ljósárin, sýnisbágar, parkerings- og ferðsluviðurskiftir og nýtsluna. Eisini ynskir grannin at koma á fund við umsitingina at umrøða hesi viðurskiftir.

Á fundi tann 30. oktober 2020, har tveir grannar luttóku, vístu grannarnir enn einaferð á tey viðurskiftir, sum í høvuðsheitum eru umrødd og viðgjørd áður í sambandi við grannahoyringina í 2018, m.a. á amparnar, ið tey meta at nýtslan og byggingin fara at hava á umliggjandi øki, serliga hotellvirksemi og økt ferðsla umvegis Rektaragøtu.
Eisini vístu tey á, at tey framhaldandi meta bygningin verða ov høgan í mun til ásetingarnar og at neiligu skuggaárinini verða alt ov stór.

Grannin, matr. nr. 169, vildi á fundinum gera vart við, at hann, umframt at røkja egin áhugamál, eisini røkir áhugamálini hjá íbúgvunum úti á Reyni og og økinum sum heild. Eisini legði hann dent á, at verkætlanin er eitt sera stórt inntriv í økið og kemur at hava sera stóra ávirkan á tey, ið har búgva.

<u>Fundur við byggiharra</u>
24. november 2020 var fundur millum byggiharra og umsiting. Byggiharrin var kunnaður um, at umsitingin metir at inntrivið í Rektaragøtu verður ov stórt vísandi til amparnar fyri nærmastu grannar og økið sum heild.
Umsitingin vísti eisini á, tað ikki ber til at steðga allari ferðsluni eftir Rektaragøtu í arbeiðstíðarskeiðinum men kann viðmæla, at bygt verður uml. 2,5 m inn undir gøtuna soleiðis at eitt ferðsluspor kann verða opið undir allari byggingini.
Gangandi ferðsla kann so leiðast eftir gøtuni eystanfyri.

<u>Samanumtøka</u>
Ætlanin um at byggja inn undir Rektaragøtu stavar í høvuðsheitum frá einum ynski um at innrætta parkeringspláss í kjallarahæddini. Byggiharrin vísir á, at hetta hevur eitt stórt virði fyri verkætlanina.

Umsitingin hevur frá fyrsta degi sagt, at ynski hjá Tórshavnar kommunu er at avmarka ferðsluna út eftir bryggjuni í Vágsbotni og í økinum sum heild, í so stóran mun sum gjørligt og at parkeringskjallarin tískil kann gerast óneyðugur. Hetta er tó ein vági, ið byggiharrin er fúsur at taka.

Sum áður nevnt, hevur umsitingin higartil verið jaliga sinnað í mun til ætlaðu bygging inn undir Rektaragøtu, men eftir at hava umhugsað málið av nýggjum, verður tað einans mett ráðiligt at loyva bygging á uml. 2,5 m inn undir vegin soleiðis, at ferðslan eftir Rektaragøtu kann skipast við einum spori í arbeiðstíðarskeiðinum og at neyðsynjarakfør framhaldandi kunnu nýta hesa farleið. Hetta vil eisini verða viðvirkandi til at avmarkað møguligar ampar í byggitíðarskeiðinum.

Viðv. øðrum viðmerkingum, ið grannarnir hava til byggingina sum heild, metir umsitingin framvegis, at nýtslan er í tráð við ásetingarnar og at hæddin skal mátast frá hægsta jørðildi á vegnum Bryggjubakki/Rektaragøta soleiðis sum ásett í serstøku byggisamtyktini fyri økið og at frávik og onnur viðurskiftir annars, eru lýst og viðgjørd áður.

Byggiharrin hevur framleitt eitt skuggadiagram, og sambært skuggadiagramminum, vil bygningurin viðføra neiligan skuggavirknað á økið eystanfyri, eins og verandi bygging í økinum ger tað. Serliga ger hetta seg galdandi í vetrarhálvuni. Byggingin heldur seg innanfyri hæddarásetingarnar og frávikið viðv. mønu er viðvirkandi til at bøta um ljósviðurskiftini á staðnum.

Umsitingin hevur eftirkannað hæddarupplýsingarnar í myndugleikaprosjektinum og staðfestast kann, at upplýsingarnir eru eftirfarandi.
Ætlaða byggingin heldur seg innanfyri hæddarásetingarnar og viðmerkjast skal, at eindin D1 í serstøku byggisamtyktin loyvir lutfalsliga høga bygging.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.nr. 14/00242 P/F Poul Hansen Heilsøla søkja um brúksrætt til økið fram við bygningunum, á matr nr. 180c, 180d, og180e (Bryggjubakki 4, 6 og 8), ið er vegastrekkið niðan móti Havnar kirkju

**Nýggj fylgiskjøl:**
J. nr. 17/01760-53 Skuggadiagram
J. nr. 20/04019-1 Áheitan um fund – skriv frá granna á matr. nr. 169, Tórshavn

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at loyvi verður givið til at byggja uml. 2,5 m undir vegin litra I, treytað av:
- at koyrandi ferðsla verður skipað við einum spori, sum er í minsta lagi 3,0 m breitt, meðan arbeitt verður.
- at eitt fullfíggjað prosjekt og tíðarætlan verður send kommununi til góðkenningar áðrenn arbeiðið byrjar.
- at byggiharrin ber allan kostnað av arbeiðinum, eisini møguligar útreiðslur sum standast av verkætlanini.
- at beina málið í teknisku nevnd í sambandi við vegin og ferðsluviðurskiftini.
- at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina í sambandi við nýtslurætt til øki og leiguavtalu.

Og annars við treytum sum umsitingin setur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum fall við fýra atkvøðum fyri og níggju ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg og Gunvør Balle.

# 91/21 Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 4/21 | 20/03621-37 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 28/21 | 20/03621-37 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 65/21 | 20/03621-37 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 91/21 | 20/03621-37 |

**Upprunin til málið:**
Eftir áheitan frá íbúgvum á Mikkjalstrøð, hevur kommunan yvirtikið vegin Mikkjalstrøð, og harvið ábyrgdina av viðlíkahaldi av hesum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Bæði kloakk- og yvirflatuvatnsleiðingarnar, ið ganga gjøgnum Mikkjalstrøð, eru í ringum standi. Av tí at tað er neyðugt at asfaltera vegin, metir umsitingin, at tað er skilabest at alt, ið liggur í vegnum, verður gjørt í góðan stand, soleiðis at tað ikki kemur fyri, at gravast skal í ein nýasfalteraðan veg.

Ráðgevi hevur gjørt eina verkætlan og boðið hana út sum innbodna lisitatión.

**Lógir, ásetingar o.a.**
NA

**Upplýsingar frá umsitingini**
NA

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
NA

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
NA

**Umhvørvisárin**
NA

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Lisitatiónsprotokoll j. nr. 20/03621-30

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Samlaði kostnaðurin at fyrireika, útinna og hava eftirlit við arbeiðinum, er mettur til kr. 4,2 mió. Arbeiðið er partvís nýgerð og partvís rakstur.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 4.200.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 4.200.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 6875 | Nýggj | | 6875 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1) umsitingin tekur upp samráðingar við arbeiðsgevaran, ið hevði lægsta boð, sí lisitatiónsprotokoll j. nr. 20/03621-30, um at gera arbeiðið at dagføra leiðingarnar í vegnum Mikkjalstrøð og at
2) játta kr. 2,7 mió. av konto 6875, L00001, løgukarmur fyri árið, á nýggja verkætlan "Kloakk Mikkjalstrøð", og kr. 0,5 mió. av konto 6810 og kr. 1,0 mió. av konto 8112
3) beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 92/21 Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 16/21 | 20/03632-29 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 62/21 | 20/03632-29 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 92/21 | 20/03632-29 |

**Upprunin til málið**
Fyri uml. 10 árum síðani fór Tórshavnar kommuna undir at betra um kloakk viðurskiftini í Kollafirði. Arbeiðið er ikki liðugt, og hetta málið er eitt av fleiri økjum, ið liggja eftir.

**Lýsing av málinum**
Hetta arbeiði er partvís at deila yvirflatuvatn frá kloakk, og partvís at samla grátt spillivatn og leiða tað í ein pumpubrunn, fyri at minka um talið av útrenningum út í fjørðin. Eisini fevnir arbeiðið um at drena feskvatn fram við matr. nr. 154 og 107h, ið er ein gomul avtala millum Tórshavnar kommunu og eigararnar av nevndu matriklum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
NA

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
NA

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
NA

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) Omanfyri nevnda arbeiðið verður boðið út, sí 20/03632-31 og 20/03632-30
2) Kr. 750.000 verða játtaðar av konto 6875, Kloakkir, L00001, Løgukarmur fyri árið, á nýggja verkætlan "Kloakk við Sjógv"
3) beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 93/21 Formel áheitan um yvirtøku av landsvegum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.11.2020 | 62/20 | 20/03830-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 15/21 | 20/03830-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 63/21 | 20/03830-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 93/21 | 20/03830-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er komin frá Landsverk, við áheitan um at Tórshavnar kommuna yvirtekur hesar fýra landsvegir, sum eru í kommununi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eftir áralangt samskifti millum Tórshavnar kommunu og Landsverk um yvirtøku av landsvegum í kommununi, eru partarnir komnir ásamt um stóru avbjóðingarnar hjá íbúgvum og virkjum fram við landsvegi í býarøki. Ein formlig áheitan er nú komin frá Landsverki til kommununa at yvirtaka hesar landsvegir.

1. Hvítanesvegin – frá vegamótinum frá Eystara Ringveg til nýggju rundkoyringina við eysturoyartunnilin íroknað strekkið frá íbindingini í Hvítanesvegin oman til og við vegristina í vegnum oman á Hvítanes.
2. Vegin oman til gomlu Hoyvíkina, Kurdalsvegur – frá Hvítanesvegnum til túnið við gomlu royndarstøðina í Hoyvík.
3. Oyggjarvegin – frá økinum undir Krákugjógv niðan til og við íbindingina til Hotel Føroyar
4. Velbastaðvegin – frá vegamótinum frá Marknagilsvegnum til og við rørportið við Norðasta Horn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Umsókn frá Landsverk, um at yvirtaka landsvegir
Kort yvir landsvegir í TK.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **Ja** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Í fyrsta umfari eru ikki nakrar fíggjarligar avleiðingar, vegirnir skulu verða í góðum standi, t.v.s. at kommunan ikki skal gera ábøtur á vegirnar tey fyrstu árini eftir yvirtøku. Sum tíðin líðir, skal roknast við vanligum viðlíkahaldi fyri hesar vegir, á sama hátt sum fyri aðrar vegir hjá kommununi.
Játtanin á øllum rakstrarkonti fyri vegir í 2020 er 37.664.000 kr. og metratal av kommunalum vegum er áleið 150.000 m, svarandi til einar rakstrar upphædd á 250 kr./m.
Vegirnir, ið skulu yvirtakast, eru samanlagt áleið 5100 m, svarandi til ein árligan rakstrar kostnað áleið 1.300.000 kr.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dk<br>k | Dk<br>k |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dk<br>k | Dk<br>k |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dk<br>k |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at umsitingin fær loyvi til at arbeiða víðari við at yvirtaka hesar 4 landsvegir og seinni koma aftur í teknisku nevnd, tá málið er endaliga klárt.

**Tekniska nevnd 17. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Landsverk vil hava, at Tórshavnar kommuna yvirtekur nevndu landsvegir í núverandi standi.

Støðulýsing av vegunum:
1. Hvítanesvegurin er asfalteraður í 2020 og er í góðum standi
2. Vegin oman til gomlu Hoyvíkina, Kúrdalsvegur – frá Hvítanesvegnum til túnið við gomlu royndarstøðina í Hoyvík, er asfalteraður og er í góðum standi.
3. Oyggjarvegurin er í góðum standi og skal roknast við at verða asfalteraður aftur um 10 ár.
4. Velbastaðvegurin er í rímiliga góðum standi, roknast skal við smávegis lappingum og skal roknast við at verða asfalteraður um 5 ár.

**Tilmæli:**
Vísandi til, at vegirnir liggja innanfyri kommunumark, og at kommunan hevur møguleikar at gera útstykkingar o.a. uttan at fyrihalda seg til strongu krøvini um frástøðu frá Landsverk framvið vegunum, og at bygging longu er framvið onkrum av vegunum, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at nevndu vegir verða yvirtiknir og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 94/21 Vágsbotnur - skipan av økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 44/18 | 18/00808-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 78/18 | 18/00808-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 58/18 | 18/00808-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 127/19 | 18/00808-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 196/19 | 18/00808-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 159/19 | 18/00808-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 176/19 | 18/00808-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 180/19 | 18/00808-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 310/19 | 18/00808-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 274/19 | 18/00808-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 129/20 | 18/00808-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 141/20 | 18/00808-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 191/20 | 18/00808-1 |
| 14 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 152/20 | 18/00808-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 43/21 | 18/00808-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 56/21 | 18/00808-1 |
| 17 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 94/21 | 18/00808-1 |

**Upprunin til málið:**
Skipan av økinum í Vágsbotni er ein liður og møgulig verkætlan í miðbýarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Trappan, søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið. Vágsbotnur er sostatt ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Men torgið og uttanum økið er í dag ikki serliga væl skipað í mun til hvørt annað og virksemið á staðnum, ferðslu, trygd v.m. og vantar ein betri skipan og heildarloysn fyri økið.

Í sambandi við at skipa økið í Vágsbotni, skal pláss vera fyri gerandisdegi og veitslu, og hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast.

Torgið kann skapa betri møguleikar til uttandura virksemi sum t.d. marknaðardagar, borðreiðing og spæl. Ein partur skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men ynskið er at flyta koyribreytina fyri at skapa eitt størri samanhangandi og vælvirkandi torg.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera skipanaruppskot av torginum og at íverkseta projektering til skipan av økinum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til fyrireikandi arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 28.02.2019 varð í málinum Miðbýarætlan - Steinatún, journal. nr. 14/05065, samtykt at játta 1 mió. kr av verkætlanini L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum til býartorgið í Steinatúni.

Arbeiðið at gera skipanaruppskot og at íverkseta projektering til skipan av økinum í Vágsbotni varð av tí orsøk útsett. Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini Marin Katrina Frýdal ynskir nú at fara í holt aftur við fyrireikandi arbeiðið, men verkætlanin vantar játtanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275, L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt skitsuuppskot til skipan av Vágsbotni. Uppskotið byggir víðari á miðbýarætlanina og tekur støði í og samantvinnar náttúru, menniskja, søgu og mentan.
Í uppskotinum, verður bryggjukanturin longdur út í sjógvin, so betri pláss er til uppihald og eisini betri pláss til fiskasølutorgið. Lagt verður upp til, at farleið hjá bilum verður einvegis, mitt eftir økinum so eitt torg verður hvørjumegin vegin, framman fyri trappuni eystanfyri og eisini á økinum vestanfyri farleiðina.

Belegningur verður ætlaður soleiðis skipaður, at tað eggjar bilum at seta ferðina niður, soleiðis at talan meira verður um eina seyrugøtu enn høvuðsfarleið.

Plantur og innbúgv eru ætlað flytilig, soleiðis at økið er hugnaligt at vera í, og so at hetta er lætt at broyta í mun til tey ymsu tiltøkini.

Skitsuætlanin sum fyriliggur, verður grundarlag undir almennari hoyring á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, har borgarar kunnu gera viðmerkingar til ætlanina, og koma við hugskotum til Vágsbotn í framtíðini.

Innkomin hugskot verða viðgjørd og tikin við í víðari prosjekttilgongdini.

Tá hetta er gjørt, verður prosjekteringin boðin út, og prosjekteringssáttmáli við ráðgeva um skipanaruppskot og prosjektuppskot lagdur fyri nevndina aftur.

**Skjøl:**
18-00808-8 *Vágsbotnur_skipan_framløga*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at verandi skitsuuppskot verður lagt til almenna hoyring, uppskotsfasan verður boðin út, og sáttmáli við ráðgeva lagdur fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Neyðugt verður at gera forkanningar og annað í sambandi við at prosjektering verður boðin út.
Til samlaðu ætlanina fyri Vágsbotn verður neyðugt at raðfesta fíggingina at ætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 2.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, til verandi verkætlan L62034, Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 3.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arkitektakappingin um at skipa torgið í Vágsbotni er liðug. Úrslitið av kappingini varð almannakunngjørt 11.06.2020, og gjørdist Zeta Arkitektar vinnari av kappingini.

Á seinasta fundi varð kunnað um innkomnu uppskotini og dómsnevndarálitið, sum nú kunnu síggjast í málinum.

**Skjøl:**
Dómsnevndarálit 2020_Undirskrivað, journal nr. 18/00808-18
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #71421 (Zeta Arkitektar), journal nr. 18/00808-19
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #14547 (Henning Larsen), journal nr. 18/00808-20
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #23308 (SNA Arkitektar), journal nr. 18/00808-21

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at staðfesta dómsnevndarálitið, og at heimila umsitingini at fara í sáttmálasamráðingar við Zeta Arkitektar og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við byggi- og býarskiparnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020**: Atkvøtt varð um meirilutatilmælið hjá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Síðani projektkappingina í mai/juni 2020 um torgið í Vágsbotni var hildin, so er stígur komin í verkætlanina. Fleiri partar hava víst á, at vinnandi uppskotið ikki er nóg sterkt at fara víðari við, ynskiligt hevur verið at umraðfesta og hyggja at økinum av nýggjum og frá øðrum vinklum.

Hetta merkir, at umsitingin í núverandi løtu ikki arbeiðir víðari við vinnandi uppskotinum.

Kappingin legði upp til, at vinnarin av kappingini fekk møguleikan at samráðast við Tórshavnar kommunu um at standa sum høvuðsráðgevi fyri allari verkætlanini. Ráðgevararnir, sum ikki vunnu kappingina, men lótu nøktandi tilfar inn, fingu kr. 75.000 (u/MVG) fyri at luttaka í kappingini.

Sostatt verður mett, at vinnarin av kappingini, Zeta Architects, somuleiðis eiga at verða samsýndir eins og hinir luttakandi ráðgevarnir í kappingini við eini upphædd áljóðandi 75.000 kr. u/mvg.

Harafturímóti verður mett ráðiligt at hyggja upp á økið enn einaferð við tí fyri eyga at innlima virkandi í økinum og innanhýsis áhugapartar í eitt samstarv um eina fyribils skipan av økinum yvir summari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at

- vinnandi ráðgevin verður samsýndur við eini upphædd áljóðandi 75.000 kr. u/mvg av L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- samsýningin verður trekt frá aftur einum møguligum framtíðar sáttmála um víðari projektering av torginum.
- heimila umsitingini at skipa torgið yvir summarið við at innlima ymisku áhugapartarnar, soleiðis at fyribils verkætlanin kann virka undir eini endaligari skipan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at arbeiða víðari við vinnandi uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 326 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 95/21 Spælipláss í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 341/20 | 20/04607-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 253/20 | 20/04607-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 358/20 | 20/04607-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 318/20 | 20/04607-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 49/21 | 20/04607-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 58/21 | 20/04607-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 95/21 | 20/04607-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur avgjørt at játta 2 mió. kr. av eykajáttanini fyri oktober til spælipláss í kommununi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ì sambandi við at heildarætlan fyri Gundadal hevur verið í umbúnað, sí mál nr. 18/03453 Skipan av Gundadali, hevur tað verið lagt upp til, at tvey økir verða løgd av til rørslu og spæl, umframt torgið frammanfyri/sunnanfyri Tórsvøll.

- Annað spælipláss verður lýst sum eitt eitt náttúruspælipláss og er staðsett í økinum norðanfyri ovara vøll. Sí j.nr. 20/04607-3 Náttúrukent spælipláss norðanfyri ovara vøll.
- Somuleiðis verður økið millum Tórsvøll og Høllina á Hálsi lagt av til stórar rørslur, parkour, free running v.m. Sí j.nr. 20/04607-4, Stórar rørslur ml. Tórsvøll og høllina á Hálsi.

Myndirnar lýsa í stórum trekkum hvat ætlanin er at fremja á hesum økjum til gagn fyri allar borgarar í kommununi, staðsett í Gundadali, sum hvønn dag savnar hópin av borgarum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heildarætlanin fyri Gundadal er enn ikki endaliga samtykt, men er ætlanin at gera smáu tillagingarnar í ætlanini fyrst í 2021 fyri síðani at leggja ætlanina fyri avvarðandi nevndir og býráð.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03453 Skipan av Gundadali
20/04581 Tórsvøllur Torg

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at eykajáttanin áljóðandi 2 mió. kr. verður bókað á konto 6275, á nýggja verkætlan "Spælipláss og onnur átøk í Gundadali", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ein foreldrabólkur at børnum í frítíðarskúlanum í Batmintonhøllini hevur av sínum eintingum arbeitt við at skaffa tvey tilboð inn til gerð av einum spæliplássi í økinum norðan fyri ovara vøll. Sí skjal j. nr. 20/04607-11, tilboð_Innsport_Batmintonhøllin spælipláss og j. nr. 20/04607-12_Prull_Spæliplássið í Gundadali.

Umsitingin arbeiðir við at kanna tilboðini í mun til góðskutrygging og býarskipanarliga í mun til heildarætlanina í Gundadali, umframt í mun til ynskini hjá foreldrunum, frítíðarskúlanum og Børn og ung.

Heildarætlanin fyri Gundadal lýsir spæliplássið sum eitt náttúruspælipláss, sum umframt at lúka tørvin hjá frítíðarskúlanum, eisini skal kunna virka sum eitt alment spælipláss, har børn í øllum aldri skulu kunna nýta, t.d. tá fótbóltsdystir eru á ovara vølli.

Játtan áljóðandi 2 mió. kr. er tøk á konto 6275, L62044, Spælipláss í kommununi, til verkætlanina.

**Skjøl**
Journal nr. 20/04607-11, Tilboð_Innsport_Badmintonhøllin spælipláss
Journal nr. 20/04607-12, Tilboð_Prull_ Spæliplássið í Gundadali

| **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 328 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at halda fram við spælipláss verkætlanini, at umsitingin setir arbeiðið í gongd at fíggja av kt. 6275, L62044, Spælipláss í kommununi og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 96/21 Brúgv í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 48/21 | 21/00684-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 59/21 | 21/00684-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 96/21 | 21/00684-1 |

**Upprunin til málið**
Í des. 2018 varð frílendisætlanin fyri Havnardal gjørd av Ósbjørn Jacobsen Arkitektum. Ætlanin legði upp til, at fremja ymisk átøk hvørt eftir annað. Sí j.nr. 21/00684-4, Havnadalur Frílendisætlan Desember 2018_Ósbjørn Jacobsen Ark.

Í 2019 vóru nøkur av átøkunum framd. Hesi vóru:
*1. Nýggj gróðurseting, sum styðjar uppundir verandi viðarlund, og sum samstundis virðir serstaka landslagið í dalinum.*
*2. Víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum*
*3. Fleiri benkur fram við gøtunum*

Sambært ætlanini er næsta átak, ið skal raðfestast, átak 4
*4. Lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum, við at gera smáar timburbrúgvar*

**Lýsing av málinum**
Grøna økið og viðarlundin í Havnardali er eitt fríøki, ið verður dagliga nýtt av mongum. Sandá rennur ígjøgnum økið, og er hon samlandi fyri fríluftsvirksemið í Havnardali.

Sum nú er, eru gonguleiðir lagdar inn í lendið báðumegin áarbakkan, men ongar gongubrúgvar eru gjørdar yvir um ánna, sum ger tað torført og til tíðir vandamikið at koma sær yvirum.

Sambært frílendisætlanini hevur júst hetta sambandið yvirum ánna eisini ein berandi leiklut í upplivingini av staðnum.

Roknast kann við at hetta fríøkið fer at draga munandi fleiri fólk at nýta økið komandi árini í tráð við at býurin veksur, og at økið millum Horna verður bygt.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt at gjørdar verða tríggjar brúgvar í økinum. Sí j.nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnadali01, umframt j.nr. 21/00684-3, Sniðdømi, Ósbjørn Jacobsen 2018.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í D1 økið í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, lagt av til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt.

Umframt at økið er innanfyri friðingarlinjuna við Sandá og skal Náttúrufriðingarmyndugleikin sostatt hoyrast og geva loyvi til brúgvarnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Havnadalur – fríøkið, Journal nr. 17/02248

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Journal nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnardali01
Journal nr. 21/00684-3, Sniðdømi_Ósbjørn Jacobsen2018
Journal nr. 21/00684-4, Havnardalur Frílendisætlan, Desember 2018_ Ósbjørn Jacobsen Ark.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at farið verður undir at gera brúgvarnar, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av konto 6275, L0001, Løgukarmur fyri árið, á konto L62033, Havnardalur – fríøkið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 97/21 Miðbýarætlan - Havnará

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 27/21 | 21/00407-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 57/21 | 21/00407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 97/21 | 21/00407-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um at raðfesta miðbýin, soleiðis at trivnaðurin í miðbýnum framhaldandi hækkar, og er ynski um at lata Havnará uppaftur á strekkinum frá Betri banka og oman á Vaglið framvið Tinghúsgarðinum.

**Lýsing av málinum**
Fleiri málsetningar eru í visiónini hjá býráðnum um at skapa trivnað í einum býi. Høvuðsstaðurin skal vera alheimsgjørdur og fjølbroyttur, har rúm skal vera fyri ymiskum áskoðanum, hugskotum og mentanum, tí soleiðis verður gott hjá øllum at liva, búgva og virka. Býurin skal vera ein livandi býur við upplivingum og avbjóðingum, men eisini ein býur við tryggleika og nærleika.

Eitt nú við hesi visjónini fyri høvuðsstaðin varð hugskots- og prosjektkappingin fyri miðbýin í 2014 hildin. Bæði kappingin og seinni Miðbýarætlanin frá 2016, arbeiða báðar fyri, at býurin gerst áhugaverdur og savnandi fyri borgararnar í kommununi, men somuleiðis ein slóðandi høvuðsstaður fyri Føroya land.

Borgarar spyrja eftir upplivingum og sakna ein livandi bý eins og teir vit kenna frá útlondunum. Býarøkini mugu skapa møguleika fyri uppihaldi millum havnarfólk, Føroya fólk og ferðafólk, og tí skal Tórshavnar kommuna skapa karmar fyri einum náttúrligum samanspæli millum hesi.

At lata Havnará upp aftur er eitt beinleiðis átak fyri at geva býnum enn eitt býarrúm við einum aktiviteti/virki, sum vit annars ikki hava niðri í miðbýnum longur. Søguliga sæð, so eru áirnar spor í lendinum, og hava tær stóran týdning fyri, hvussu lendið verður fatað, og eru tær við rennandi vatninum og tí lívið, sum kann nørast á staðnum, livandi, dragandi og savnandi.

Í uml. ár 1960 varð Havnará lokað á leiðini frá Ebenezer fram við Tinghúsinum og oman á Vaglið.

Upprunaliga gekk áin frá Villingadali, oman í Gundadal, víðari oman gjøgnum plantasjuna, framvið Sjónleikarhúsinum og oman gjøgnum miðbýin/Vaglið og oman á Kongabrúnna. Størsti parturin av ánni er í dag undir jørð, og verður væntandi heldur aldrin latin uppaftur, hetta grundað á ymisk viðurskiftir, so sum kloakk, núverandi virksemið omaná lokinum o.s.fr.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt, at fara undir at lata partin av ánni upp frá Betri banka og oman á Vaglið, fyri síðani at meta um og taka støðu til, um tað er ráðiligt at lata ánna upp allan vegin omaneftir Áarvegnum og oman á Kongabrúnna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**

Øllum kunnugt, so verður áin í dag nýtt sum kloakk heilt uppi frá Sjónleikarhúsinum, og skal tað gerast møguligt at lata part av ánni uppaftur, so verður neyðugt at taka hædd fyri hesum og fáa kloakkina skipaða serskilt frá ánni. Tekniska deild, sum varðar av kloakkunum vísir á, at hetta kann gerast upp á fleiri mátar, men verður neyðugt at gera eitt neyvari kanningar og prosjekteringsarbeiði hesum viðvíkjandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
16/00491_Miðbýarætlanin

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í framhaldandi tilgongdini verður neyðugt at kanna málið væl, tosa við avvarðandi áhugapartar, soleiðis at øll viðurskiftir eru greidd, tá farið verður undir arbeiðstøkuna.

**Skjøl**
Sí j.nr. 21/00407-2: Mynd: Havnará – Vaglið,

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Verkætlanin er í núverandi løtu ongan veg komin, og tískil er ómøguligt at lýsa fíggjarligu viðurskiftini. Hetta verður at greina nærri seinni í tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- At 1.000.000 kr. verða fluttar av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið til nýggja íløgu "Havnará" á konto 8175.
- At umsitingin fer undir at lýsa verkætlanina, gera neyðugar kanningar og fyrireika verkætlanina.
- At umsitingin verður heimilað at bjóða partar av verkætlanini út, um mett verður neyðugt við serráðgeving til verkætlanina
- At avvarðandi nevndir verða kunnaðar leypandi.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við ætlanini vísandi til óvissuna um endaliga kostnaðin og hvussu hetta ávirkar aðrar grundtænastur, ið kommunan skal veita.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

# 98/21 Keyp av parti av litra ap (Dalavegur) og part av matr. 805, at leggja saman við matr. 803f

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 47/21 | 21/00857-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 17/21 | 21/00857-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 60/21 | 21/00857-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 98/21 | 21/00857-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við íbúðarverkætlan á matr. nr. 803f, søkja eigararnir um at keypa part av matr. nr. 805 og litra ap, uml. 200 $m^2$ í alt, sí skjal *Øki at keypa*. Hetta fyri at veita neyðug parkeringspláss til íbúðarverkætlanina.

**Lýsing av málinum**
Økið, ið søkt verður um at keypa, liggur í dag sum "restøki", á vegamótinum Dalavegur/Pedda við Stein gøta og mett verður, at tað er hóskandi at nýta hetta økið til parkeringspláss til íbúðarverkætlanina við Sílagøtu.

Tekniska deild hevur ongar viðmerkingar til møguligu søluna. Tó viðmerkir tekniska deild, at neyðugt er at tryggja eitt nøktandi útsýni frá Pedda við Stein gøtu og út á Dalavegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært §2, stk. 3 í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn nýtist kommunal fastogn ikki at verða boðin út alment, um talan er um sølu av økjum, ið eru minni enn 300 $m^2$ til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á. Í hesum føri er talan um at selja lendi, ið er til víddar uml. 200 $m^2$, og sostatt er talan um lendi, ið kommunan kann selja, uttan at hetta er boðið alment til sølu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn,* journal nr. 20/01446.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Øki at keypa,* journal nr. 21/00857-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Um umsóknin verður gingin á møti, verður eitt ávíst gjald goldið kommununi fyri lendið. Vanligt er at selja fyri marknaðarprís, ið t.d. verður ásett við virðismeting.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at játta umsóknini um keyp av lendi sambært skjalinum *Øki at keypa,* og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 99/21 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 | 18/03468-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 26/21 | 18/03468-1 |
| 18 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 61/21 | 18/03468-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 99/21 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:

- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til

- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan “Stóratjørn” undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan “Stóratjørn” undir konto 6275.

3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin "skipan av Stórutjørn" er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vitandi um, at kommunan hevur tørv á størri byggilendi, er tað avgerandi fyri býarmenningina, at planleggingin av kommununi er framtíðartryggjað og í tráð við tær ætlanir og avbjóðingar, sum kommunan stendur upp ímóti.

Í vár varð arkitektakapping skipað um skipan av Stórutjørn, sum sambært Kommunuætlanini er fremst raðfest til býarvakstrarøki í kommununi. Tvær fyritøkur vunnu rættin at verða knýtt at prosjekteringsarbeiðinum sum ráðgevi at gera forprosjekt til fremstu raðfestingina av ætlanini.

Fyri at kunna fara inn á økið við teimum framtíðarætlanum, sum fyriliggja, er tað tí av stórum týdningi at endaliga skipanin av Stórutjørn verður raðfest.

Umsitingin ynskir at fara í samstarv við vinnandi fyritøkurnar fyri at nágreina skipanina av økinum, og gera raðfestingar, soleiðis at farast kann undir partar av útstykkingini.

Stóratjørn er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin verður neyðugt at fara í samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum.
Kappingin fevndi um økið matr. nr. 135ed og matr. nr. 1æf. Víddin á matriklunum er:
- matr. 135ed er 108175 $m^2$ til støddar (kortvídd)
- matr. 1æf er 117.184 $m^2$ til støddar (kortvídd)

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at yvirtaka í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin kann gerast veruleiki í stigum.

Somuleiðis er at upplýsa, at arbeitt verður við avtaluni millum Landsverk og kommununa um innkomuvegin, sum endaliga kemur at hava stóra ávirkan á virkið í Stórutjørn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta 2 mió. kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur), L62039, Stóratjørn til framhaldandi skipan av økinum.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið skal viðgerast tvær ferðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at broyta játtan 2 mió. kr. til ikki at taka av konto 6475 men av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímót og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang.

# 100/21 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.08.2020 | 149/20 | 20/01446-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 169/20 | 20/01446-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 226/20 | 20/01446-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 283/20 | 20/01446-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 46/21 | 20/01446-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 100/21 | 20/01446-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um bygging á matr. nr. 803f, Tórshavn. Ætlanin er at taka vinnubygningin, sum liggur á matriklinum niður, og byggja íbúðir ístaðin.

Økið liggur í einum A1 sethúsaøki. Í almennu byggisamtyktini er ásett, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 18. mai 2020 varð byggimálið viðgjørt og samtykt varð at fara undir arbeiðið at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, sí skjal *Fyrispurningur um íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Tórshavn.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin er at byggja ein íbúðarbygning í 2 hæddum, og skal byggingin fylgja teimum bygningsregulerandi ásetingunum fyri A1 øki. 14 íbúðir, umframt goymsluskúrar, 16 parkeringspláss, parkeringspláss til súkklur og felags tún eru í økinum. Ætlanin er at umleggja vegin frá at liggja eystanfyri bygningin, til at liggja vestanfyri bygningin.

Mett verður, at ætlaði íbúðarbygningurin hóskar betri til økið, enn vinnubygningurin, sum ætlanin er at taka niður. Matrikulin liggur í einum øki við blandaðari bygging, við sethúsum, raðhúsum, almennum stovni. Ætlaða íbúðarbyggingin á matr. nr. 804a verður mett at hóska til dámin í økinum. Bygningurin liggur framvið markinum móti suðuri og eysturi, og hevur felagsøki vestanfyri millum bygningar og parkering.
Byggingin hevur ávirkan á grannar og atkomu til grannaognir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki, kap. 4, § 5, eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu byggjast tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri at tryggja gott vegasamband víðari niðan eftir Sílagøtu, er neyðugt hjá umsøkjaranum at keypa uml. 12 $m^2$ av matr. nr. 803s. Samráðingarnar um hetta keypið eru í gongd.
Í sambandi við skipan av byggingini skal tryggjast at nøktandi ferðsluviðurskifti eru til grannaognir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Pedda við Stein gøta/Sìlagøta Tórshavn,* journal. Nr. 19/01524.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Fyrispurningur um íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Tórshavn,* journal nr. 19/01524-17.
- *Keypsavtala_07.07.2020.pdf,* journal nr. 20/01446-4.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu,* journal nr. 20/01446-7.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum treytað av at umsøkjarin ger nøktandi atkomu til matr. nr. 803y, vísandi til notat j.nr. 20/01446-9.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina av uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, eru viðmerkingar komnar frá trimum av grannaognunum, sí skjøl *Viðmerking 1* og *Viðmerking 2.* Niðanfyri er ein bólking og samandráttur av hesum viðmerkingum:

1. Byggingin og dámurin á økinum:
- Tað verða 3 ferðir so nógvir bústaðir á Sílagøtu (14 nýggjar íbúðir), í mun til hvussu nógvir eru í dag.
- Dámurin á byggingini er ikki í trá við friðarliga og familjuvinaligu atmosferuna í økinum, við fríttstandandi húsum við havum, trøum og øðrum vøkstri.
- Fleiri av húsunum í økinum fara at verða nógv ávirkaði av íbúðarblokkinum. Øll byggigrundin verður hevja, samstundis sum bygt verður til mark, bæði viðvíkjandi hædd og til mark – 7,5 m høgt og 2,5 m frá marki.
- Prinsippielt merkir hetta, at eitthvørt friðarligt sethúsaøki kann broytast til eitt øki (sum í Hoyvík), har húsini liggja so tætt, at einki privatlív er longur.

2. Parkering og ferðsla:
- Vegirnir í økinum eru allir pakkaðir við koyrandi og parkeraðum bilum, tað er ikki rúm fyri 20+ bilum afturat.
- Víst verður á, at Pedda við Stein gøta er ein ferðslu æðr til og frá barnagarði, vøggustovu og skúla. Vegurin er smalur og ongar gongubreytir eru á henni.
- Nøkur av parkeringsplássunum, sum eru av stórum týdningi fyri tey verandi húsini í økinum, hvørva. Serliga er tað lærarafelagið í Pedda við Stein gøtu 9, sum brúkar nógv pláss.
- Ein av grannunum (matr. nr. 803y) missir innkoyringina til sítt stykki.

3. Uppskot til broytingar
- Verkætlanin eigur at verða umhugsað av nýggjum, og í øllum førum minkað í mun til fyriliggjandi ætlan.
- Fækka um íbúðareindirnar, soleiðis at lutfallið millum búeindir pr. kvm. verður í trá við økið annars.
- Nøgdin av parkeringsplássum eigur at samsvara við talið av íbúgvum.
- Vísa atlit til grannar, so teir framhaldandi kunnu hava eitt privatlív, uttan at tann ætlaða byggingin hevur beinleiðis útsýni inn í stovur teirra, umframt at tað ávirkar nøgdina av dagsljósi munandi. Hetta kann t.d. gerast við at økja um frástøðuna til mark til t.d. 4 m, umframt at minka um bygningshæddina.

- Heitt verður á býráðið um fyrst at gera ábøtur á Pedda við Stein gøtu, so vegurin verður tryggari fyri skúlabørn, áðrenn loyvi verður givið til bygging av eini so stórari verkætlan sum hesari.

Ad. 1. Mett verður, at ætlaði íbúðarbygningurin hóskar betri til økið, enn vinnubygningurin, sum ætlanin er at taka niður. Matrikulin liggur í einum øki við blandaðari bygging, við sethúsum, raðhúsum, almennum stovni, og hevur hetta við sær, at økið ikki hevur ein eyðsýndan sethúsadám.

Viðvíkandi byggiregulerandi ásetingum, so sum hædd og frástøða til mark, so fylgir verkætlanin treytunum í almennu byggisamtyktini. Um tað t.d. vóru sethús, ið vóru bygd, ístaðin fyri íbúðir, so høvdu hesi somuleiðis havt møguleikan fyri at bygt 7,5 m høgt og 2,5 m frá marki, og hevði hetta sostatt haft somu ávirkan á privatlívið hjá grannaognunum, sum íbúðarbyggingin hevur.

Almenna byggisamtyktin ásetir, at íbúðir kunnu verða bygdar í A1 økjum, sum annars eru útløgd til sethús, um mett verður, at hetta hóskar til økið. Um so er, skal ein serstøk byggisamtykt gerast fyri økið.

Ad. 2. Viðmerkingarnar um ferðslu og parkering eru viðgjørdar saman við teknisku deild. Tekniska deild ásannar, at trýstið á Pedda við Stein gøtu er stórt, serliga í meldurtíð. Nøgdin av íbúðum er tó avmarkað, í mun til ferðsluna eftir Pedda við Stein gøtu í meldurtíð, og ferðslan frá íbúðarbyggingini fer væntandi í størstan mun at vera út á Dalavegin. Mett verður tí ikki, at ferðsluviðurskiftini á Pedda við Stein gøtu eiga at hava ávirkan á ætlaðu íbúðarbyggingina á Sílagøtu.

Íbúðarætlanin skal fylgja ásetingunum um parkering í almennu byggisamtyktini. Tað, at aðrar ognir í økinum ikki megna at veita parkeringsøki til brúkarar sínar, eigur ikki at ávirka hesa ítøkiligu verkætlanina.

Loysn skal finnast á atkomuviðurskiftunum til matr. nr. 803y, áðrenn málið verður sent Landsstýrinum til endaliga góðkenning.

Ad. 3. Vísandi til omanfyrinevndu grundgevingar, so verður framvegis mælt til, at íbúðarbyggingin á Sílagøtu verður loyvd.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Sílagøtu, treytað av at loysn verður funnin á atkomuviðurskiftunum til matr. nr. 803y í samstarvi við eigararnar, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi hin 26. november 2020 varð samtykt at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Sílagøtu, treytað av at loysn varð funnin á atkomuviðurskiftini til matr. nr. 803y í samstarvi við eigararnar.

Síðani seinasta býráðsfund hevur umsitingin verið á fleiri fundunum við eigararnar av matr. nr. 803y og við umsøkjara, fyri at finna ein loysn uppá atkomuviðurskiftini, men tað hevur víst seg at verið trupult at funnið eina loysn, sum báðir partar taka undir við, sí fylgiskjal *Uppskot til atkomur*, ið vísir nakar av møguleikunum, ið hava verið umrøddir.

Tí hevur umsøkjari gjørt eitt tillagað skipanaruppskot, har atkoman til matr. nr. 803y er tryggjað, sum ein tinglisin rættur á matr. nr. 803f. Sambært hesum uppskotinum fær matr. nr. 803y eina privata innkoyring millum ognina og nýggja íbúðarbygningin, inn til verandi p-pláss.

Tekniska deild hevur góðkent eina vegbreidd á 5,5 m fyri partin av Sílagøtu, ið er innanfyri økið í byggisamtyktini og gongubreyt á 1,5 m á einari síðu av vegnum. Koyrikurvar eru gjørdar fyri innkoyringina til matr. nr. 803y, ið vísa, at møguligt er hjá einum bili at venda inni á økinum, so ikki er neyðugt at bakka út á Sílagøtu, sí skjal *Koyrikurvar*.

Smb. tillagaða skipanaruppskotinum, er íbúðarbygningurin fluttur eitt vet longur suður/vestur, og gongur hetta útyvir nøkur av p-plássunum á økinum. Tískil ynskir umsøkjari at keypa part av matr. nr. 805 og ap, samanlagt uml. 200 $m^2$, soleiðis at neyðugu p-plássini kunnu skipast á hesum økinum, sí kort *Øki at keypa.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna tillagaða uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu smb. skjalinum *SB_Tórshavn_Sílagøta_2020_6*, treytað av at umsøkjari fær loyvi at keypa samanlagt uml. 200 $m^2$ av matr. nr. 805 og litra ap, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 101/21 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri neyst, matr. nr. 208, Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 44/21 | 20/04637-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 24.03.2021 | 3/21 | 20/04637-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 101/21 | 20/04637-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 208, Kollafjørður, hevur søkt um loyvi at stykkja út til neystagrundir. Økið liggur í E øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, og skal bygging og skipan av økinum gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 208, Kollafjørður, er partur av einum uml. 2800 $m^2$ stórum neystaøki í Kollafirði, sum matr. nr. 211c, 211a og 209b, somuleiðis eru partar av. Uppskotið til serstaka byggisamtykt fevnir um allar 2800 $m^2$.

Uppskotið til serstaka byggisamtykt loyvir frítíðarbústaði á ovaru hæddini, men umstøður skulu vera at hava bát á niðastu hædd, og annars eru ásetingarnar tær somu, sum fyri onnur neystaøki í kommununi, sí skjal *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur sum E øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og ásetingarnar fyri økið eru:

§24, stk. 1. Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og virksemi, sum hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t.

Stk. 2. Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Av tí at økið liggur fram við sjóvarmálan, skal serstaka byggisamtyktin góðkennast av Yvirfriðingarnevndini.

**Skjøl**
- *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8,* journal nr. 20/04637-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. mars 2021 | Blað nr.: 347<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri neyst í Kollafirði, smb. skjalinum *SB_Kollafjørður_Neyst_2020_8,* treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 24. mars 2021:** Staðbundna nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

# 102/21 Umbøn um lendi og broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 126a, Nólsoy frá C-øki til D-øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 19/21 | 20/04633-2 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 18.03.2021 | 2/21 | 20/04633-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 102/21 | 20/04633-2 |

**Upprunin til málið:**
Nólsoyar Kirkjuráð hevur eitt ynski um at betra um hølisumstøðurnar hjá kirkjuliðnum. Tørvur er á einum vesi og á hølum til kirkjukaffi og aðrar samkomur, sum hoyra nútímans kirkju til.

Kirkjuráðið hevur tí leitað eftir hóskandi byggilendi til høvið, men hevur tað ikki eydnast teimum at finna egnað økið, antin tí at grundøkini eru privat, ella tí aðrar ætlanir eru við økinum.

Tí søkir Nólsoyar Kirkjuráð nú um loyvi at nýta økið á grótkastinum frammanfyri kirkjuna til staðseting av nýggjum kirkjuhúsi, sí mál *Umsókn um, at Tórshavnar kommuna letur part av matr. nr. 126a, Nólsoy til at byggja kirkjuhús niðanfyri kirkjuna*, umframt at broyta byggisamtyktina fyri økið frá C-havnaøki til D-øki til almennar stovnar og mentan, sí skjøl *Áðrenn broyting* og *Eftir broyting*.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við umsóknina um lendi og broyting av byggisamtykt, hevur Kirkjuráðið verið á fundi við umsitingina. Økið frammanfyri kirkjuna er sera sjónligt, og ávirkar sýnið til ikonisku kirkjuna, og tí ynskti umsitingin at síggja tekningar fyri at kanna, um tað er møguligt at byggja frammanfyri kirkjuna uttan at órógva myndina av kirkjuni á kirkjutanganum ov nógv.

Innsenda uppskot til kirkjuhús, sí skjal *Kirkjuhús á grótkastinum – uppskot,* vísir ein bygning, ið er staðsettur inn undir grótkastið og hægsta punktið yvir vatnskorpuni er 5,5 m. Tá rakar takið á kirkjuhúsinum 50 cm upp um brimgarðin. Mett verður, at talan er um eina varsama loysn, ið tekur atlit til- og órógvar kirkjuna sum minst.

Sambært ásetingini fyri D-øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy, kunnu bygningar einans verða bygdir eftir byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað økið. Tað hevur stóran týdning, at víðari viðgerin og endaligt byggiloyvi verður givið í samráð við býararkitektin og samtykt av viðkomandi politiskum nevndum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri C – havnaøki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:

- Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu, samferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.

Ásetingar fyri D – øki til almennir stovnar og mentan eru m.a.:

- Økið verður lagt av til almennar stovnar, undirvísing, mentanarlig endamál, átrúnaðarlig, heilsulig endamál o.t.
- Bygningar kunnu bara verða bygdir eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Innsenda uppskotið tekur ikki hædd fyri veðurlagsbroytingum og hækkandi vatnstøðu. Um loyvi verður givið til bygging í hesum økinum, hevur tað stóran týdning, at hesi viðurskifti, umframt onnur teknisk viðurskifti, verða kannað nærri, og eru partur av umsóknini um byggiloyvi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Kirkjuráðið í Nólsoy, (matr. nr. 101 og 207): Áheitan um fund um at byggja kirkjuhús á matr. nr. 126a, Nólsoy,* journal nr. 18/04439.
- *Umsókn um, at Tórshavnar kommuna letur part av matr. nr. 126a, Nólsoy til at byggja kirkjuhús niðanfyri kirkjuna,* journal nr. 19/01481.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um øki, sum Tórshavnar havn umsitur, og tískil skal málið til hoyringar hjá teimum. Umsøkjari hevur verið á fundi við Tórshavnar havn, har niðurstøðan var, at Tórshavnar havn ikki hevur nakað ímóti bygging á økinum, um tað var tekniskt forsvarligt.

Av tí at bygt verður upp at friðaðum bygningum, skal málið til góðkenningar hjá fornminnismyndugleikanum.

Av tí at bygt verður niðri við fjøru, skal málið til góðkenningar hjá náttúrufriðingar myndugleikanum.

**Skjøl**

- *Umsókn um byggilendi,* journal nr. 20/04633-1.
- *Kirkjuhús á grótkastinum – uppskot,* journal nr. 20/04633-1.
- *Áðrenn broyting*, journal nr. 20/04633-6.
- *Eftir broyting, journal nr. 20/04633-6.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At góðkenna broytingina av byggisamtyktini fyri Nólsoy sambært kortskjalinum *Eftir broyting,* treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og fornminnismyndugleikanum.
- At viðgerðin av byggiloyvinum verður í samstarvi við býararkitektin.
- At beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 18. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

## 103/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.
Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin  fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

# 104/21 Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 99/17 | 16/03741-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 121/17 | 16/03741-6 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 176/17 | 16/03741-6 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 207/17 | 16/03741-6 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 239/17 | 16/03741-6 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 305/19 | 16/03741-6 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 47/20 | 16/03741-6 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 73/20 | 16/03741-6 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 28.04.2020 | 3/20 | 16/03741-6 |
| 10 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 175/20 | 16/03741-6 |
| 11 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 164/20 | 16/03741-6 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 232/20 | 16/03741-6 |
| 13 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 270/20 | 16/03741-6 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 254/20 | 16/03741-6 |
| 15 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 104/21 | 16/03741-6 |

**Málslýsing:**
Á heystið 2016 fekk Tórshavnar kommuna umsókn frá Stuðulsnevndini fyri svimjihyli í Nólsoy um yvirtøku av øllum skyldum viðvíkjandi matr. nr. 126a, ið er eystanfyri Nólsoyar skúla (sí hjálagt skriv).

Nevndin metir tað vera ósannlíkt at hon klárar at fullføra verkætlanina við svimjihyli. Nevndin hevur nú ístaðin í hyggju at broyta endamálið í viðtøkunum og heldur fara undir at gera eitt savn til minnis um Ova Joensen og hansara roysni.

25. november 2016 vóru umboð fyri løgdeildina og mentamáladeildina á fundi og ástaðarfundi við umboð fyri Stuðulsnevndina úti í Nólsoy (sí hjálagda fundarfrásøgn).

7. mars 2017 kemur uppfylgjandi skriv frá Stuðulsnevndini um málið (sí hjálagt skjal).

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá verandi anleggi á matr. nr. 126a og møguleikunum har og teimum møguleikunum, sum eru fyri staðseting av einum komandi savnsvirksemi og hvør samrakstur er hugsandi við aðrar partar.

Út frá tí ber til at meta nærri um, hvørt farast skal víðari í samskiftinum við Stuðulsnevndina og aðrar partar um møguliga verkætlan. Henda tilgongdin vil so avklára nærri fyritreytirnar fyri hesi verkætlanini sum mentamálanevndin so fær aftur til viðgerðar í heyst.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til yvirskipað at umrøða uppskotið hjá

Stuðulsnevndini og at taka støðu til, um farast skal víðari við samskiftinum um eina møguliga savnsverkætlan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Samtykt at umsitingin tekur upp víðari samráðingar við umsøkjaran, um hvørjar aðrar loysnir kunnu vera hugsandi, herundir í onkrum verandi bygningi/húsi.

**Ískoyti**
Við støði í samtyktini hjá nevndini á seinasta fundi málið var fyri, hevur umsitingin verið í samskifti við stuðulsnevndina. Við støði í tí hevur nevndin latið inn nýtt uppskot við fleiri hugsandi møguleikum. Sí hjálagt skriv.

Talan er um:
a). Royndarhúsið
b). Avhaldshúsið
c). Lonin

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hvønn ella hvørjar av hesum valmøguleikunum, ið umsitingin skal samskifta víðari við stuðulsnevndina um.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Nevndin ynskir at fáa nærri lýsing av teimum trimum møguleikunum at leggja aftur fyri nevnd.
**Ískoyti**
Stuðulsnevndin er sbrt. umbøn komin við dagførdum uppleggi til framtíðar loysn og sum betri lýsir tær áður umrøddu loysnirnar. Sí hjálagt skjal.

Viðv. loysnunum
- Lonin er bygningur hjá Tórshavnar kommunu, ið verður umsitin av Tórshavnar Havn.
- Kunningarstovan leigar í bygningi hjá privatum eigara. Ein loysn har krevur nærri samráðingar við eigaran.
- Royndarhúsið er sum áður nevnt bygningur hjá Royndarhúsfelagnum og krevur at felagsskapirnir finna saman um eina loysn.

Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá uppskotunum og møguleikunum sum eru í teimum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu um
a). loysnin við Lonini skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
b). loysnin við Kunningarstovuna skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
c). loysnin við Royndarhúsinum skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við loysn a) og beina málið til ummælis í vinnunevndini.

Marin Katrina Frýdal og Heðin Mortensen vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Málið kom ikki sum hugsað fyri í vinnunevndini.

Hinvegin avgjørdi vinnunevndin á fundi 3. apríl 2019 í máli 19/01422 - umsókn frá Biofar um at leiga stampagoymsluna at gera leigusáttmála við Biofar um somu hølir, ið annars vóru í umbúna til Ovasavn. Øll Lonin er uml. 100 m2, meðan Biofar leigar 33 m2, umframt bíðihøli hjá SSL eru har og arbeiðsrúm hjá tekniska økinum. Virksemi hjá Biofar kemur ætlandi at geva føst arbeiðspláss í oynni.

Meiri grundleggjandi kundi málið lutvíst ikki gjøgnumførast av tí, at byggisamtyktin har er havnaøkið og at tilgongd eisini skuldi fara í gongd viðv. at broyta byggisamtyktina – hetta er nú ávegis til politiska viðgerð.

Tulkingin hjá umsitingini var at talan var um eitt savn viðv. bátavirksemi og sjólívi og tí møguliga kundi góðtakast á einum havnaøkið.

Á borgarafundi í Nólsoy 23. oktober fekk TK handað eina umsókn um 'Verkætlan Savnsdepil í Nólsoy' - sí hjálagt skjal.

Í skrivi frá nevndini 23. oktober verður greitt frá at tey kenna til verkætlanina um savnsdepil, men at nevndin ynskir sum útgangsstøði at fasthalda sína verandi umsókn um stuðul og samstarv og nú at halda fram við loysn b). at keypa hølini har Kunningarstovan hevur verið og at TK inngongur í ta verkætlanina. Stuðulsnevndin metir at útlitini fyri einum savnsdepli eru meiri óviss og vil tí fyrst og fremst fremja hesa verkætlanina og kann savnsdepilsverkætlanin so vera áhugaverd seinni um hon skuldi komið so langt einaferð í framtíðini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til broytta byggisamtykt á Havnaøkinum á Klivum, umframt gjørt uppskot til skipan og innihald á økinum, herundir at eitt margvirksemishús - við nakað sama innihaldi sum verkætlanin við savnsdepli lýsir kann vera. Sí hjálagt uppskot til skipan av økinum. Enn óvist viðv. víðari tilgongd við broyting av byggisamtykt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja antin:

a). at boðað umsøkjaranum frá at farið verður víðari í dialoginum um møguliga hølisloysn í Kunningarstovubygninginum ella øðrum bygningi í bygdini og avklára leiklutin hjá TK.
ella
b). at arbeiða víðari við at menna eina verkætlan á havnaøkinum, tá byggisamtyktin ætlandi er broytt.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Nevndin samtykti at taka undir við punkt a).

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini seinast hevur stuðulsnevndin fyrireika uppskot til loysnir í bygdini. Sí hjálagt skjal.

Á fundinum greinar umsitingini fyrimunir og vansar við ymsu loysnunum.

Fígging
Um farast skal víðari við ætlanini verður mælt til at útvega fígging á fíggjarætlanini fyri 2021.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja um:

a). haldast skal fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um eina loysn og b). at velja hvørja ella hvørjar av loysunum í sofall arbeiðast skal víðari við.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at halda fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um loysn og beina uppskot um at matr. nr. 19 og 92a verður framtíðarloysn fyri Ovasavn í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Matr. 19 og 92a, Nólsoy, sum uppskot er um skal nýtast sum framtíðarloysn fyri Ovasavn, liggur sum D øki, ætlað almennum stovnum og mentan, í byggisamtyktini fyri Nólsoy. Sostatt eru ætlanirnar í tráð við ásetingarnar fyri økið.

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan um at umskipa økið úti á Klivum, soleiðis at tað umframt havnavirksemi, eisini fevnir um m.a. mentan, smátt vinnuvirksemi, tænastuvirksemi og íbúðir. Í tí sambandi hevur man umrøtt møguleikan fyri at staðseta Ovasavnið í økinum úti á Klivum. Ætlanin varð løgd fram á borgarafundi í Nólsoy hin 23. oktober 2019 og bíðað verður eftir, at staðbundna nevndin viðger ætlanina og vendir aftur við viðmerkingum.

Hetta er tó ein long tilgongd, og eingin niðurstøða ella samtykt fyriliggur uppá ætlanina enn.

Nevnast skal, at onnur, t.d. Nólsoyar Bjargingarfelag og Nólsoyar róðrarfelag, hava víst áhuga fyri sama øki.
Sí skjal *Dokument* journal nr. 2005-1087/5 og
*TórshavnNew Microsoft Office Word Document* journal nr. 15/01767-1.
Møguliga kundi okkurt av hesum virkseminum húsast í sama bygningi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við, at Ovasavnið verður staðsett á matr. nr. 19 og 92a, Nólsoy, og beina málið í staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 28. apríl 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við at haldast skal fram við samráðingingunum um Ovasavnið og og taka fund við Bjargingarfelagið um útbygging á áðurnevnda matr. nr. 19 og 92a.
**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samskifti við Stuðulsnevndina og tekur hon undir við at fara víðari við fyrireikingunum og herundir fáa til vega eitt skitsuuppskot til bygning á økinum at søkja um byggiloyvi við. Talan er um byggisamtykt, ið sum útgangsstøði hevur byggistig á 0,3 og tí er hóskandi at vita, um frávik kann fáast áðrenn farið verður undir at gera endaliga avtalu og at projektera verkætlanina.
Bjargingarfelagið
Samskifti hevur eisini verið við Bjargingarfelagið og ynskja tey eina loysn á sama stað, ið er torfør at sameina við hesa verkætlanina. Mett verður meiri hóskandi at tað verður arbeitt fram móti eini betri loysn aðrastaðni.
Fígging
Stuðulsnevndin hevur eina ogn á umleið 500 tkr. og ynskir eitt gjald frá kommununi fyri at kommunan tekur yvir toftirnar á matr. 126a. Umframt at felagið kann søkja um annan stuðul til at fremja verkætlanina. Í samanleggingarsáttmálanum millum Tórshavnar kommunu og Nólsoyar kommunu frá 2004 er spurningurin um Ovasavn nevndur í punkt 29F (Sí hjálagt skjal).

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at fara undir at gera treytaðan leigusáttmála við stuðulsnevndina um langtíðarleigu av matr. 19 og 92a, har felagið skal hava fingið útvegað byggiloyvið til ein bygning innan 1 ár.
b). at fara undir samráðingar við Stuðulsnevndina um yvirtøku av matr. 126a.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur havt fyrireikandi fund við stuðulsnevndina. Nevndin hevur júst latið inn umsókn um byggiloyvi. Sí hjálagt nakrar tekningar. Væntandi kemur ein niðurstøða tí viðv. í heyst.

Nevndin hevur í hyggju at fáa stuðul frá kommununi, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, fyritøkum og grunnum. Nevndin hevur meldað út at hon hugsar at stuðul frá TK íroknað endugjald fyri lendið har svimjihøllin skuldi brúkast skal vera umleið 1.000 tkr. Í sofall má hædd takast fyri tí í fíggjarætlanini fyri 2021 ella 22.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða, hvørt fíggjarligar raðfestingar skulu gerast av málinum í 2021 ella 22.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt.

Heðin Mortensen varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti**:
Nevndin í felagnum hevur søkt um byggiloyvi til verkætlanina og væntast svar í hesum árinum. Somuleiðis er nevndin farin undir fyrireikingar til at søkja um stuðul til verkætlanina.

Sum liður í at skipa viðurskiftini til framtíðar tørv og ætlanir er felagið farið undir tilgongd at umskipa felagið til ein grunn. Sí hjálagt verandi viðtøkur. Ætlanin er at fara burtur frá ætlanin um svimjihyl og til burturav at hava savnsvirksemi sum endamál.

Eisini er ásett í § 11: "**§ 11.** Verður felagið upployst, skulu ognir felagsins latast í grunn, íð Mentunardeildin í Tórshavnar kommunu umsitur til frama fyri Dianu Victoriu."

Hugsanin er at kalla til eykaaðalfundar og niðurleggja felagið og gera ein grunn.

Tey hugsa eisini, at grunnurin hevði eina nevnd við 5 limum, harav 1 valdur av kommununi og ein av kunningarstovuni.

Sum útgangsstøði metir umsitingin, at ætlanirnar um at gera felagið um til ein grunn kunnu góðtakast. Umsitingin metir tó ikki neyðugt at binda kommununa til at hava ein nevndarlim í grunninum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at umrøða spurningin um at loyva felagnum at umskipa seg til grunn. Mælt verður harumframt til ikki at hava kommunala umboðan í nevndini fyri grunnin.

Mælt verður til at beina málið til ummælis í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við, at felagið umskipar seg til grunn. Harumframt samtykt ikki at hava kommunalan nevndarlim í grunninum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Málið umrøtt.

# 105/21 Uppskot til loysn á stóru parkeringstrupulleikunum í miðbýnum í Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 105/21 | 21/01260-1 |

**Upprunin til málið**
Birgir Nielsen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund 25. mars 2021

**Lýsing av málinum**
Tað er í dag almenn vitan, at tað eru ovurhondsstórir og vaksandi parkeringstrupuleikar í Havnini. Talið á bilum er munandi økt síðstu mongu árini, sum hevur viðvirkað til nógv økta ferðslu í Havnini og ikki minst í Miðbýnum. Harumframt kemur ta betraða sambandi við einum Eysturoyartunnli, og einum komandi Sandoyartunnli og helst eisini einum Suðuroyartunnli bert at gerða støðuna viðvíkjandi parkering enn verri í Miðbýnum í Havn næstu árini, um onki verður gjørt.

Staðfestast má, at nógv økta ferðslan gongur álvarsliga út yvir trivnaðin hjá okkara borgarum og ferðafólki, sum ferðast, starvast ella eru til handils í Miðbýnum í Havn.

Hetta er orsøkin til at undirritaði reisir hetta málið í býráðnum.

Tað má staðfestast at tørvurin er ovurhonds stórur at fáa eina varandi loysn á parkeringstrupuleikunum í Miðbýnum í Havn.

Við støði í, at undanfarna býráð og meirluti í 2020 setti pening av til ein parkeringstunnil, vil eg koma við fylgjandi alternativum tilmæli um loysn á parkeringstrupuleikunum í Miðbýnum í Havn:

1.) At farið verður undir fyrireiking, staðseting og bygging av nýggjum parkeringshúsið á Skálatrøð í Havn innanfyri 1-2 ár, sum rúmar 300-500 bilar. Møguliga kunnu eisini 2 parkeringshús byggjast á Skálatrøð og Bursatanga, sum arkitektauppskot fyrr hava víst á.
2.) At møguleiki skal gevast til at privatar vinnufyritøkur um neyðugt kunnu byggja og langtíðarleiga og reka slíkt parkeringshús.
3.) At tann peningur, sum var játtaður til fyrireiking av bygging av parkeringstunnli í 2020 samstundis verður fluttur til fyrreiking og projektering av parkeringshúsi.

Mælt verður til, at málið verður samtykt og verður beint í avvarandi nevnd til skjóta og góða viðgerð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

## 106/21 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |
| 25 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 127/19 | 16/01715-2 |
| 26 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 216/20 | 16/01715-2 |
| 27 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 200/20 | 16/01715-2 |
| 28 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 167/20 | 16/01715-2 |
| 29 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 242/20 | 16/01715-2 |
| 30 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 193/20 | 16/01715-2 |
| 31 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 34/21 | 16/01715-2 |
| 32 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 52/21 | 16/01715-2 |
| 33 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2021 | 56/21 | 16/01715-2 |
| 34 Mentamálanevndin | 24.03.2021 | 68/21 | 16/01715-2 |
| 35 Fíggjarnevndin | 25.03.2021 | 72/21 | 16/01715-2 |
| 36 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 106/21 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**

Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka

undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Imóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Í fjør samtykti býráðið treytað skeyti og ætlanarskriv við ÍSF. ÍSF er ikki komið á mál við innanhýsis tilgongdini hvørt felagsskapurin byggir nýtt høvuðssæti við Ovara vøll í Gundadali.

Fyri at tryggja at ætlanin um bygging av langhyli kann byrja og fyri at ÍSF kann fáa eitt sindur longri skotbráð til at avgera spurningin um nýtt høvuðssæti, var í juli 2020 var fundur millum ÍSF og TK í sambandi við málið um staðseting av nýggjum ÍSF-húsi.

ÍSF er ikki enn komið á mál við tilgongdini um nýtt ÍSF-hús. Av tí at tað ikki er endaligt, um ÍSF vil byggja við Ovara vøll ynskir felagsskapurin at kunna kapitaliserað tað virði, sum annars lág í virðinum í ætlaðu staðsetingini (byggibúning og sambygging). Hetta var í 2019 mett til 3,55 mio.kr. ÍSF hevur tí ynski um at leingja skotbráðið til at fara undir bygging eitt ár afturat í mun til áður ásetta dato í 2024. T.v.s. at ÍSF skal hava gjørt galdandi hetta endurgjaldið innan 31. desember 2025, tá tað eisini verður evsta freist fyri at felagsskapurin er farin undir at byggja við Ovara vøll.

Sí hjálagt
a). Dagført skeyti
b). Dagført ætlanarskriv
c). Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti

Stjórn í ÍSF hevur principielt tikið undir við hesum skjølunum, men skal sbrt. lógunum hjá felagsskapinum leggja tað fyri á eykaaðalfundi til góðkenningar og verður tað ætlandi um umleið 3 vikur.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at innganga hjálagda skeyti, ætlanarskriv og sáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
ÍSF hevði eykaaðalfund 16. september 2020 til at taka støðu til endaligu skjølini.

Eykaaðalfundurin ynskti og samtykti eina minni broyting í skjalinum 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti'.

Talan er um umorðingar, sum innibera, at í tann mun, at ÍSF ikki ger álvara av at byggja við Ovara vøll í Gundadali, so skal TK bjóða ÍSF eitt annað hóskandi byggibúgvið grundstykki. Meðan orðingarnar frammanundan ikki innibóru eina skyldu til at royna tað, men at TK kundi velja at gera tað.

Hinvegin so stendur óbroytt við, at um partarnir ikki semjast um tann møguleikan, so fær ÍSF endurgjald á 3,55 mio.kr. fyri útreiðslur, ið TK annars ætlandi hevði havt av byggibúning av øki sunnanfyri og vestanfyri skýlið við Ovara vøll í Gundadali, umframt sambygging við sjálvt skýlið. ÍSF kann gera hetta endurgjald galdandi frá 1. januar 2021 og inntil 31. desember 2025.

Umsitingin metir at henda broytingin ikki broytir grundleggjandi uppá tað, sum er ætlanin yvirfyri ÍSF og tí kann gerast.

Fyri at tað skal vera samsvar millum samtyktina hjá ÍSF og hana hjá kommununi er neyðugt at staðfesta broytingina. Sí hjálagt dagført skjal 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Hini bæði skjølini (skeyti og ætlanarskriv), ið vóru samtykt á seinasta fundi, standa við óbroytt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja dagførda skjalið 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Málið verður beint býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi 21. januar 2021 heitir ÍSF á kommununa um at fara undir tilgongd, har nýtt høvuðssæti til ÍSF verður bygt oman á FIMI í Gundadali. ÍSF vísir á, at nú ÍSF húsast i fyribilshølum, er tørvur á at fáa gongd á endaliga hølisloysn skjótast gjørligt bæði til virksemið hjá ÍSF og sersmbondum í ÍSF.

Kommunan og ÍSF hava í fleiri umførum samskift um nýtt høvuðssæti til ÍSF. Í hesum sambandi eru tvey ætlanarskriv gjørd, har tað í 2016 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti oman á Fimi, og í oktober 2020 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti við skýlið á Ovara vølli í Gundadali.

Ynskið er sostatt at venda aftur til upprunaligu ætlanina. FIMI er ítróttabygningur, sum mentamálanevndin varðar av.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera áheitanina frá ÍSF, og beina málið um staðseting av nýggjum ÍSF høvuðssæti oman á FIMI í byggi- og býraskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við staðseting oman á Fimi og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt og mælir til at hoyra Havnar Fimleikarfelag og Fimleikafelagið Ljósið.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir at fáa málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt hoyra virkandi feløg og at leggja málið fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Ískoyti og tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
15. mars 2021 var fundur við umboð fyri virkandi fimleikafeløgini í Fimi, Havnar Fimleikafelag og Ljósið. Umboðini vístu á stóra tørvin á fleiri og betri umstøðum at venja fimleik í, serliga vísti umboðini fyri Ljósið á vánaligu umstøðurnar, sum fimleikafelagið hevur í fimleikahøllini í Sankta Frans skúla, og umboðið fyri Havnar Fimleikafelag vísti á, at teirra úrvalsfimleikarar mugu til Runavíkar og Klaksvíkar at venja, tí tey mangla tímar í Fimi. Nógv íðka fimleik, og tað er av stórum týdningi, at fimleikurin verður hugsaður inn í verandi hølir í kommununi, og í komandi út-/nýbyggingar.
Somuleiðis vístu umboðini á, at tað sera óheppið, um møguleikin at vaksa um fimleikavirksemið í Gundadali verður steðgað, grundað á, at bygt verður til okkurt annað virksemið omaná Fimi. Borgarstjórin lovaði, at feløgini vera kallaði innaftur, tá tekningar fyriliggja viðv. bygging av ÍSF omaná FIMI.

Fyri kommununa er málið viðv. ÍSF somuleiðis týðandi at fáa loyst, tí felagsskapurin er undir stórum trýsti og er staðsetingin av nýggja bygninginum týðandi fyri at felagsskapurin hevur nakað ítøkiligt at arbeiða fram ímóti.

Í sambandi við um verandi bygging (Fimi) tolir at verða bygt omaná, so gjørdu MT Højgaard útrokningar hesum viðvíkjandi í 2008, sí viðhefta skjal 16/01715-90 Utrokningargrundarlag, sum somuleiðis er at finna í j. nr. 2008-4245/118.
Útrokningarnar vísa, at tað er møguligt at byggja tvær hæddir oman á verandi bygging. Hesar hæddir skulu gerast sum lættar konstruktiónir.

Gundadalur er í dag rættiliga tætt bygt, og verður mett, at virksemið hjá ÍSF væl kann verða staðsett aðrastaðni enn oman á Fimi. Fimi húsar fimleikinum, og um fimleikurin skal víðkast í økinum, so er upplagt at tað verður gjørt við, at byggja omaná Fimi. Um møguleikin at víðka um virksemið verður steðgaður við at byggja ÍSF oman á Fimi, so verður mett, at fimleikurin eigur at verða hugsaður inn í framtíðar verkætlanir innan ítróttin.
Tað er skilligt, at ÍSF ynskir at verða staðsett í Gundadali, tí stórur partur av ítróttarvirkseminum í kommununi er her, og sostatt vil virksemið, sum felagsskapurin umboðar síggjast aftur í uttanumhvørvinum. Spurningurin er bara, um felagsskapurin sær møguleikar í at verða staðsett aðrastaðni í Gundadals-økinum, her verður t.d. hugsað um møguleikan at byggja hølir til ÍSF kring Tórsbreyt, um breytin verður víðkað við einum bygningi, ella um ein bygging verður bygd omaná parkeringsøkið út móti R.C. Effersøes gøtu. Hesar nevndu staðsetingarnar eru ikki neyvt kannaðar, men býarskipanarliga verður mett, at hesar staðsetingarnar yvirskipað eru betri egnaðar til virksemið í mun til at “kroysta” virksemið inn í Gundadalsøkið, umframt at møguleikin at víðka um fimleikavirksemið tá ikki verður steðgaður.

Av tí at málið er átrokandi at fáa loyst, og aðrar staðsetingar enn omaná Fimi ikki hava verið umrøddar við ÍSF, umframt at teirra ynski hevur verið at verða staðsett oman á Fimi, so verður mett ráðiligt, at mæla til at staðseta ÍSF oman á Fimi. Tó hevði verið ynskiligt, um aðrar staðsetingar somuleiðis vórðu umrøddar við ÍSF.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta ÍSF omaná Fimi, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar og í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annnfinn Brekkstein og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam og Ruth Vang, tekur ikki undir við tilmælinum á verandi grundarlagi vísandi til at aðrir møguleikar fyri staðseting í Gundadali eiga at verða kannaðir.

**Mentamálanevndin 24. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini at kanna aðrar staðsetingar í Gundadali, ið fall við fýra atkvøðum fyri, sjey ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Blankt atkvøddi: Jákup Dam.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |